FØROYA LØGMAÐUR

# FRÁGREIÐING LØGMANS Á ÓLAVSØKU 2019

LØGMANSSKRIVSTOVAN
www.lms.fo

# RØÐA LØGMANS

**Harra formaður, háttvirda Løgting og góðu føroyingar!**

»Antin – ella...«

Hesi bæði smáu orðini – »Antin – ella« – eru í so mongum karmurin um okkara lív.

Tí hvønn dag velja vit. Smá val, ið vit neyvan hugsa stórvegis um – men eisini stór val, ið hava avgerandi týdning og krevja, at vit hugsa væl um avleiðingarnar, áðrenn vit taka støðu.

Tí við valinum kemur eisini ábyrgdin.

Onkuntíð velja vit einki. Gera einki. Men tað er eisini eitt val – og ábyrgdin av avleiðingunum er okkara – eisini tá.

***

**Harra formaður!**

Tann 17. november í 1990 var ein ruskutur vetrardagur í Klaksvík. Hesin dagurin stendur rimmarfastur í minninum, hóast 30 ár skjótt eru liðin.

Bara nakrar dagar frammanundan hevði eg fylt 18 ár – og nú skuldi eg fyri allarfyrstu ferð á løgtingsval.

Fetini niðan í KÍ-høllina vóru løtt. Løtan var hátíðarlig.

Eg var glaður um loksins at sleppa at velja, hvørji virði eg helt, okkara samfelag skuldi byggja á. Hvønn veg vit skuldu fara.

Eg var spentur og vónríkur.

***

Spentur og vónríkur var eg eisini, tá ið eg fyri fýra árum síðani tók við løgmansembætinum. Tá ið vit skipaðu samgongu, settu vit okkum stór mál og í felag gjørdu av, hvønn veg, vit skuldu fara.

Og nú valskeiðið er um at renna út, havi eg grundað yvir, hvussu vónin hevur tað í dag – nú fýra ár seinni.

Tað er eingin loyna, at fleiri baldrutar løtur hava verið. Tað slepst neyvan undan, tá ið tú stjórnar einum landi.

Kortini hava vit bygt á tey virðini, sum vit framvegis av heilum huga trúgva á. Og samstarvið hevur verið gott.

Eg kann tí lættliga leggja hondina á hjartað og svara, at vónin framvegis er eins sterk – um ikki sterkari – enn fyri fýra árum síðani.

Sterkastu rótina til vónina finni eg í fólkinum. Eg havi sæð so mong dømi um, at tað í Føroya fólki býr eitt heilt serligt seiggi.

Vit eru trúføst, støðuføst og samhaldsføst.

Vit hjálpast at – og veita av okkara eintingum eina hond, tá ið á stendur.

So eg havi bjartar vónir.

Eisini til komandi val.

Eg veit, hvussu góðir føroyingar eru við fólkaræðið. Sama, hvussu tað tørnar út, virða vit úrslitið treytaleyst. Eisini tá vit eru vónbrotin.

Hetta er eingin sjálvfylgja.

Tí eitt fólkaræði má røkjast. Treytin fyri, at tað virkar væl, eru virknir borgarar, sum skyna millum sjónarmiðini hjá flokkunum, og sum síðani taka støðu. Sum eru virknir í orðaskiftinum, fylgja við og eru á varðhaldi.

Av teimum 37.000, sum nú hava valrætt, eru eini 3000 ung fólk, sum á fyrsta sinni skulu á løgtingsval. Og hvør veit? Møguliga fer eisini ein blaðungur komandi løgmaður við løttum fetum og bjartari vón á valstaðið.

Hartil eru tilflytarar, ið á fyrsta sinni skulu velja, og útisetar, ið seinastu fýra árini eru fluttir heimaftur.

Komandi vikurnar fáa tey høvi at fylgja valstríðnum og síggja, hvørji »antin-ella« eru at velja ímillum.

***

**Harra formaður!**

Á seinasta vali var úrslitið greitt. Føroyingar valdu eina nýggja kós. Eina kós móti einum nútímans samfelag við javnbjóðis rættindum fyri øll. Eina kós, sum skuldi fáa valdið og virðini út til fólkið aftur.

Ta kósina hava vit hildið. Virðini koma nú nógv betur øllum føroyingum til góðar, heldur enn at savnast á fáum hondum.

Samfelagið er vorðið meiri tíðarhóskandi, og fólkatalið er vaksið skjótari, enn nakar hevði torað at droymt um.

Á løgtingsvalinum hesa ferð verða vit umleið 1000 veljarar fleiri enn á seinasta vali.

Hetta er met – og seinastu fýra árini eru fleiri met sett.

Ongantíð hava so nógv lisið og lært í Føroyum.
Ongantíð hava so nógv verið til arbeiðis og so fá verið arbeiðsleys.
Ongantíð hava vit havt so nógvar vinnufyritøkur og íverksetarar.
Og ongantíð hava avlopini hjá vinnuni verið so stór sum seinastu fýra árini.

Hetta er ikki komið av sær sjálvum. Øll eiga sín lut í framgongdini.

Men hóast tølini geva eina ábending um góðu gongdina, so siga tey kortini ikki alt, um tey standa einsamøll.

Tey siga ikki, hvussu gerandisdagurin hjá barnafamiljunum hongur saman, ella hvussu væl tilflytararnir gerast ein partur av samfelagnum.

Tey útgreina ikki støðuna hjá eldru borgararunum, hvussu mentanarlívið livir – ella hvussu nógv sjálvboðið arbeiði verður gjørt.

Tí hevur tað avgerandi týdning fyri meg javnan at koma í samband við tey, sum alt snýr seg um, nevniliga borgaran.

Vit frætta bara um, hvørjar avbjóðingar fólk stríðast við, um tey greiða okkum frá, hvat ið er gott, og hvat ið má gerast betur.

***

Tað er uppgávan hjá okkum politikarum at skapa karmarnar um samrøðuna.

Tí bjóðaðu vit herfyri foreldrum til morgunmat og prát um familjupolitikk. Tey, ið møttu, vóru serliga foreldur at børnum, ið stríðast við serligar avbjóðingar av ymsum slagi.
Tey høvdu nógv upp á hjartað.

Tað var rørandi – og torført at halda tárunum aftur. Og tað er júst í slíkum erligum samrøðum, at vit síggja, hvussu viðurskiftini kunnu gerast enn betri, og hvørji stig eiga at verða tikin.

Eitt annað slíkt dømi var stóra ráðstevnan, sum Almannaverkið skipaði fyri í mai. Eisini har fingu vit nógv ítøkilig dømi um, hvat eigur at verða gjørt betur.

Eitt, sum nógv teirra hava í felag, er, at tey eru móð. Móð av skipanum, sum ikki tosa nóg væl saman – maktað av ikki at kenna seg loftað á nóg góðan hátt.

Og tað vóru eisini slíkar erligar frágreiðingar, sum vístu okkum á vantandi bústaðirnar til fólk við serligum tørvi. Tí settu vit 200 milliónir av til at byggja vardar bústaðir, nýtt Barnaheim og heim til børn og ung við autismu. Hetta er største sosiala bústaðarraðfesting nakrantíð.

Slíkar viðmerkingar frá borgarum elvdu somuleiðis til, at børn og ung við sosialum og sálarligum avbjóðingum – og familjur teirra – nú fáa hjálp. Átakið "Megna títt lív" skal lofta ungum, sum hava umfatandi og samansettar trupulleikar.

Tað fer somuleiðis at merkjast væl, tá ið Rásin fer at kunna tvífalda næmingatalið.

Fremsta málið má tó vera at fáa ferð á byggingina, og at fáa ymsu skipanirnar at tosa betur saman, so tað eisini verður lættari og liviligari hjá hesum familjum.

***

Tí øll børn og ung eiga at hava somu grundleggjandi treytir fyri at eydnast í lívinum.

Míni børn. Børnini hjá grannanum. Ja, greiða málið má vera, at øll børn í landinum fáa eitt so gott útgangsstøði sum gjørligt. Hetta er kjarnin í vælferðarsamfelagnum.

Og at seta børnini á breddan hevur alstóran týdning, tí tað verða støðugt fleiri børn fødd herheima.

Tíbetur kunnu vit staðfesta, at støðugt færri børn nú liva í fátækraváða.

Góða gongdin, sum byrjaði undir undanfarnu samgongu, hevur fingið ferð á seinastu fýra árini, og málið er framvegis, at einki barn skal liva í fátækraváða í Føroyum.

Øll børn skulu kunna luttaka á jøvnum føti við javnaldrarnar.

**Harra formaður!**

Tað, at øll eiga at hava somu grundleggjandi møguleikar, leggur stóra ábyrgd á okkum politikarar at skipa inntøkur og útreiðslur á skilagóðan hátt – og best fyri flest.

Tí gjørdu vit beinanvegin nøkur hugsjónarlig val, sum góvu okkum betri fíggjarligt rásarúm.
Til dømis broyttu vit inntøkugrundarlagið. Heldur enn at hækka lønarskattin hjá hvørjum einstøkum føroyingi, rinda alivinnan og fiskivinnan nú eitt rímiligari gjald fyri síni framíhjárættindi.

Tað hevur givið okkum fleiri enn 300 milliónir krónur eyka at raðfesta fyri. Vit hava raðfest sterkari heilsu- og almannaverk. Fleiri læknar. Styttri bíðitíð. Betri samferðslu. At styrkja fólkaskúlan. Og at minka um skattin hjá lágløntum.

Samfelagið er nú samhaldsfastari. Og framvegis tvíhalda vit um, at ovurstóru virðini eiga at koma øllum føroyingum til góðar.

Vit hava sett eina nýggja fiskivinnuskipan í verk. Hon byggir á grundreglurnar um, at livandi tilfeingið í sjónum er ogn Føroya fólks og kann ongantíð gerast privat ogn.

Og, ja, nakrir tættir mangla framvegis, áðrenn nýskipanin virkar til fulnar. Men halda vit fast í grundreglunum í nýskipanini, so fara vit at síggja fleiri nýggjar og stórar íløgur heilt skjótt.

Stóra og grundleggjandi arbeiðið er nú gjørt. Vit tóku ábyrgd – vit tordu at taka neyðugu tøkini, ið skiftandi stjórnir ikki tordu at taka í áravís.

Einki at gera er eisini eitt val. Men eisini tá eiga vit ábyrgdina av avleiðingunum.

Tað lættasta er at lata standa til – serliga í góðum tíðum.

Tað er lættari – men tað er ikki rættari.

Høvdu vit einki gjørt, høvdu nøkur verið nógv ríkari og nøkur fátækari. Summi høvdu forvunnið meiri. Men ikki øll.

Vit høvdu verið nærri einum stættarsamfelagi, har nøkur eru A-borgarar og onnur eru B-borgarar. Har »antin-ella« ikki er eitt val, tí summi verða fødd til ríkidømi og stórar møguleikar, og onnur fáa eitt nógv verri útgangsstøði í lívinum.

Vit eru ikki – og skulu ikki – øll vera líka. Men vit skulu tryggja øllum á leið somu møguleikar.

Tað hevur verið aðalmálið seinastu fýra árini, og vit hava nú eitt ríkari, tryggari og liviligari samfelag.

Eg eri errin av, at okkara land nú er vorðið meiri tíðarhóskandi við longri barsilsfarloyvi, hækkaðum barnafrádrátti, lestrarstuðli, familjuískoyti – og støðugt vaksandi tali av læru-, útbúgvingar- og granskingarmøguleikum. Hetta ger, at fleiri nú velja Føroyar. Eisini stakir uppihaldarar.

Her er blivið rúmligari – eisini hjá minnilutabólkum og familjum teirra.

Vinnan hevur eisini fingið meiri tíðarhóskandi karmar. Tað er blivið høgligari at reka matstovur og gistingarhús, at framleiða og selja føroyskan mat, eins og tað er vorðið lættari at ferðast til og úr Føroyum.

At tað er vorðið rúmligari sæst eisini aftur í teimum valmøguleikunum, sum nú lata seg upp fyri okkara gávaða ungdómi. Í seinastuni hava vit sæð hópatals dømi um, at tað er vorðið léttari hjá ungum talentum at velja dreymin og ganga nýggjar leiðir heldur enn bara at fylgja smølu, siðbundnu rásunum.

**Harra formaður!**

Eg legði út við at nevna »antin – ella« hjá Kirkegaard.

Um ein mánað skulu vit aftur velja.

Hetta er eitt av teimum valunum, sum krevja rannsakan, og at vit hugsa um avleiðingarnar. Væntandi verða níggju flokkar at velja ímillum, men bara ein krossur kann setast.

Hvørja kós velja vit?

Skulu tilfeingisgjøldini í fiskivinnuni og alivinnuni aftur minkast niður í einki, og skulu nýskipaninar rullast aftur – samstundis sum persónsskatturin skal lækkast og vælferðin styrkjast?

Tað ber jú ikki til. Vit fáa ikki »bæði – og«, men mugu velja »antin – ella«. Tí vælferð kostar.

Skulu tilfeingisgjøldini lækkast við fleiri 100 milliónum, mugu vanlig fólk rinda fleiri 100 milliónir meiri í skatti, um ikki vælferðin skal skerjast ógvusliga.

Tað er at flyta pening frá vanligum fólki til nakrar fáar fyritøkur, sum fáa framíhjárættindi til at nýta okkara tilfeingi – okkara fisk og okkara firðir.

Nei, skulu komandi árini eisini roynast væl, krevst, at vit halda fast um varna fíggjarpolitikkin og menna nýskipanirnar. At vit halda fram at leggja pening til síðis til verri tíðir – sum vit vita fara at raka okkum fyrr ella seinni – og at vit hvønn dag velja tað samhaldsfasta, sjálvbjargna og tíðarhóskandi samfelagið.

Tá ið vit tóku við í 2015, arvaðu vit ein landskassa, sum hevði havt hall ikki færri enn átta ár á rað – samanlagt tríggjar milliardir.

Síðani 2016 hava vit havt yvirskot. Tilsamans meira enn hálva aðru milliard í yvirskoti hetta valskeiðið. Búskapurin er eisini meira sjálvberandi, og skuldin er minkað 1,3 milliard. Hartil er ríkisveitingin nú ein minni partur av føroyska búskapinum og av samlaðu almennu inntøkunum, enn hon nakrantíð áður hevur verið.

Kortini er alt, vit hava gjørt, væl og virðiliga fíggjað. Tí við at fremja tær átrokandi nýskipanirnar kundu vit fíggja tað, vit vildu gera á vælferðarøkinum.

Til dømis hava vit raðfest korini hjá sjúklingum.

Talið á kommunulæknum – eisini í føstum starvi – hevur ongantíð verið so stórt sum nú, og í næstum verða tilsamans 34 kommunulæknaviðtalur í landinum – tað mesta nakrantíð.

At vit nú hava savnað sjúkrahúsverkið undir einari felags leiðslu, styrkir tað – og kemur øllum til góðar.

Og at Løgtingið einmælt samtykti uppskotið um viðgerðartrygd, vísir breiða semju um, at tá ið vit gerast sjúk, skulu vit hava læknahjálp – ikki bara eitt nummar, sum staðfestir, hvar í bíðirøðini, vit eru.

Ein annar liður í at fáa fleiri læknar er, at føroysk læknalesandi nú hava fyrstarætt til lestrarstørv í Føroyum. Hetta fer sannlíkt at fáa fleiri teirra at starvast í okkara heilsuverki seinni.

Største frambrotið á heilsuøkinum er tó serlæknatalið, ið er vaksið við einum fjórðingi – úr gott 30 serlæknum til gott 40.

Síðani vit stovnaðu serlæknapuljuna í 2016 hava sergreinir, ið hava verið ómannaðar í mong ár, nú aftur serlækna í føstum starvi. Hjartalækni, giktalækni, lungalækni, diabeteslækni og røntgenlækni eru settir; somuleiðis eru fleiri psykiatarar komnir afturat, og fýra barnalæknar eru nú á barnadeildini.

**Harra formaður!**

Ein av barnalæknunum er mín góði vinmaður, Elmar Ósá.

Hann starvast á Landssjúkrahúsinum – men hann vildi gera meiri fyri børn við autismu og familjur teirra, enn hann fekk gjørt á barnadeildini.

Hann kundi latið staðið til. Ypt øksl og sagt, at onkur annar átti at gjørt okkurt.

Men í juni rann, súkklaði og svam hann 452 kilometrar og savnaði soleiðis meiri enn hálva millión krónur inn til børn við autismu. Tað var einki minni enn eitt bragd.

Allan teinin á tamb hevði hann eitt val um antin at gevast – ella at halda á.

Men hóast orkan gekk undan, hóast tað tóktist ørt og ómøguligt, – og tað hevði verið lættast at givist – so helt hann á.

Hetta avrikið vísir, hvussu vit einsæris kunnu velja at taka ábyrgd og gera mun fyri mong.

Tað vísir, hvussu besta úrslitið fæst, um alment og privat draga somu línu og styðja hvørt annað.

Hóast vit hava eitt væl ment vælferðarsamfelag, hava vit eisini ábyrgd fyri næstanum.

Tí vit vita, at lagnan kann raka hart. At hóast vit velja nógv í lívinum, so eru vit ikki harrar yvir øllum. Og vit vita, at sumt er ringt at spáa um.

***

Til dømis var vónleyst at spáa um stóra vøksturin í fólkatalinum og í ferðavinnuni – og harvið eisini árinini á umhvørvið.

Í Føroyum eru vit vælsignað við einum frælsi, ið vit ikki eiga at taka fyri givið. Vit velja, sum vit halda vera best – bæði tá ið ræður um útbúgving, vinnuveg, maka, trúgv, politiska støðu – ja, í stórt sæð øllum lutum er valið frítt.

Men ikki øll hava hetta fría valið, tá ið um egnan bústað ræður, tí trýstið á marknaðin er stórt. Og eingin hevði ímyndað sær, at tað fór at ganga so skjótt at venda gongdini við minkandi fólkatali.

Men nú tørvar okkum fleiri og fjøltáttaðar bústaðir, serliga íbúðir fyri rímiligan kostnað, lestraríbúðir og bústaðir til fólk við serligum avbjóðingum.

Nøkur stig eru tikin rætta vegin. Vit játtaðu Bústøðum 250 milliónir kr. aftur at teirri byggingini, ið var í gongd. Almenna bústaðafelagið hevur nú um 250 bústaðir, og um nøkur ár verður talið 650.

Men hetta er ikki nóg mikið. Meiri má gerast, og vinnan, privatfólk og onnur mugu eisini taka samábyrgd.

Hundraðtals hús og íbúðir standa tóm meginpartin av árinum. Tí er skatturin fyri at langtíðarútleiga lækkaður munandi. Soleiðis ber til at hjálpa øðrum føroyingum í heimloysi heldur enn ikki at leiga út – ella at stutttíðarútleiga til ferðafólk.

Tí eingin føroyingur eigur at vera heimleysur. Tað eigur at vera øllum tryggjað at hava eitt stað, sum tú við vissu veitst, er títt heim.

Her mugu vit øll hjálpa hvør øðrum og taka ábyrgd.

Tað, sum Elmar Ósá vísti, var júst ábyrgd. Og tað eru fleiri góð dømi um, hvønn mun privat fólk kunnu gera.

Átøk, sum »Fýra plastikk um dagin«, »Rudda Føroyar« og »veðurlagsverkfallið« hava øll tað í felag, at vanligir føroyingar við sterkari ábyrgdarkenslu fara til verka, heldur enn at yppa øksl og lata standa til.

Summi vilja vera við, at okkara dálking ger lítlan mun í altjóða høpi. Tað er helst rætt. Føroyar eru smáar. Men sjálvandi hava vit eina ábyrgd eins og onnur. Og um vit læra av Elmari Ósá, síggja vit, at tað sindrið, ið vit sjálvi kunnu gera, sjálvandi eisini ger mun.

Umhvørvispolitikkur byggir jú á samhaldsfesti millum lond og ættarlið.

Vit verja okkum sjálv við at verja umhvørvið.

Vit verja fiskimannin og familju hansara við ikki at oyða stovnarnar.

Vit verja alt livandi í bergi, fjørði og haga við ikki at tveita rusk í náttúruna.

Og vit verja børn, ung og komandi ættarlið, um vit røkja okkara land og hav, eins og forfedrarnir gjørdu.

Um ikki arbeiðspláss og vøkstur byggja á burðardyggar loysnir, so saga vit greinina av, sum vit sita á.

Tí tað reina umhvørvið er treytin fyri trivnaði á øllum økjum í landinum. Tað er treytin fyri okkara høvuðsvinnu.

Eitt risa fet rætta vegin er semjan millum vinnuna, havfrøðina og politisku skipanina um, hvussu vit umsita botnfiskastovnarnar undir Føroyum. Hetta eigur øll tann politiska skipanin at standa saman um.

***

Og reina umhvørvið hongur somuleiðis óloysiliga saman við ferðavinnuni.

Miðvísa marknaðarføringin hjá Visit Faroe Islands hevur munað nógv betur, enn nakar hevði torað at droymt um.

Men ferðavinnan má og skal skipast soleiðis, at náttúran verður varðveitt, og umhvørvið ikki verður dálkað.

Alt fyri eitt mugu vit gera greiðar reglur og mannagongdir fyri at ganga í haga, nær gjøld kunnu vera tikin, og hvat ið tann peningur, sum kemur inn, skal verða nýttur til.

Hetta er helst mest átrokandi avbjóðingin við ferðavinnuni í løtuni. Men afturat avbjóðingunum eru eisini stórir fyrimunir.

Íløgurnar í ferðavinnuna eru metstórar. Umsetningurin verður í ár væntandi 800 milliónir – og hann veksur støðugt. Eisini hevur ferðavinnan skapt nógv nýggj størv kring alt landið – og sum frá líður skal hon geva inntøkur alt árið.

Hartil eru fleiri spennandi mat- og mentanartilboð komin við ferðavinnuni, sum eisini vit føroyingar njóta gott av.

Og tað er eitt framstig, at vit eru farin undir at menna okkum enn meiri á ferðavinnuleiðini við útbúgvingum.

***

Sum heild hava vit hetta valskeiðið lagt doyðin á, at okkara ungu skulu velja útbúgving eftir hegni og hugi – og ikki bara fylgja streyminum til eina bókliga útbúgving.

Fyri at stuðla undir hesi gongdini er nýggj Vegleiðingarstova stovnað. Hon fer at ráðgeva ungum og tilkomnum, sum ivast í útbúgvingar- og yrkismøguleikum.

Eitt annað átak var at eftirmeta yrkisútbúgvingarskipanina – og nú verða tillagingar gjørdar og settar í verk.

Yrkisútbúgvingarnar verða somuleiðis lyftar við tí slóðbrótandi trípartasamstarvinum, ið tað loksins hevur eydnast at fáa í lag millum landsstýrið, arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar. Hetta fer at tryggja bæði fleiri lærlingar og betri útbúgvingarmøguleikar.

Samantalt eru ikki færri enn 18 nýggj útbúgvingartilboð sett á stovn seinastu fýra árini.

Eitt teirra er nýggja listaútbúgvingin, sum er kærkomin, tí vit vita, at føroysk mentan um somu tíð er bæði sterk og viðbrekin.

***

Mentanin er orsøkin til, at vit yvirhøvur búgva her. Verður hon ikki styðjað og styrkt, viknar føroyski samleikin.

Fyrr í ár sóu vit, hvussu stóran týdning søgu- og mentanararvur hevur fyri eitt fólk, tá ið víðagitna kirkjan, Notre Dame, í París fór upp í royk.

Hendingin fekk meg at hugsa um okkara egna mentanararv, og hvussu vit sjálv fara um fornminnini og søguliga arvin.

Tað er til dømis ein fongur, at hvalastøðin við Áir nú er latin upp sum savn, at vit hava fingið nýtt skjalasavn á Tvøroyri, og at vit eru farin undir at talgilda søgulig skjøl.

Men mentanararvurin snýr seg ikki bert um bygningar og ting frá eini farnari tíð. Hann snýr seg eisini um samleika, upplivingar og trivnað.

Við UNESCO sáttmálanum eru týðandi stig tikin til at varðveita livandi mentanararvin, sum okkara føroyski samleiki er grundaður á.

Og mentanin er eisini nútíðarlig. Fyri at tryggja eitt høgt mentanarstig hava vit stovnað listafólkalønina. Hon veitir tiltrongdar arbeiðsnáðir – til gleði og gagns fyri okkum øll.

**Harra formaður!**

Heimurin er nógv broyttur seinastu fýra árini.

Vit kundu latið broyttu fortreytirnar stýrt okkum. Ypt øksl, sagt ábyrgdina frá okkum og verið dølskir áskoðarar. Men vit valdu at taka stig.

Tí teljast vit nú millum tey heilt fáu londini, sum Bretland hevur gjørt fríhandilssáttmála við. Hetta tryggjar okkum, at søguliga sterki samhandilin við Bretland verður varðveittur – eisini eftir Brexit.

Vit hava eisini arbeitt miðvíst fyri at bøta um møguleikarnar hjá føroyskum útflytarum í aðrar mátar.

Týðandi stig eru tikin til at fáa betri atgongd til russiska marknaðin. Eisini líður væl at gera ein fríhandilssáttmála við Japan – og í næstum lata vit upp sendistovu í Kina. Hon skal eisini røkja okkara áhugamál í Japan, Vietnam og Suðurkorea, har stórir vakstrarmøguleikar eru.

***

Men eisini her heima hava vit tikið størri ábyrgd.

Leingi hava vit ynskt sjálv at gera av, hvussu karmarnir um familjuna verða skipaðir. Tí yvirtóku vit familjurættin fyri einum ári síðani.

Vit hava eisini tikið avgerandi fet á leiðini ímóti at yvirtaka alt útlendingaøkið. Í framtíðini fer Útlendingastovan at umsita og taka avgerðir í málum um eitt nú familjusamanføring, arbeiðs- og uppihaldsloyvi – og uppihaldsloyvi fyri lesandi.

Í hesum høpi er gleðiligt at staðfesta, at arbeiðið við at skipa føroyskt sum annaðmál stórt sæð er klárt at seta í verk.

Talan verður um ein felags innsats um alt landið, sum fer at veita tilflytarum jøvn, góð málslig tilboð, og sum so líðandi skal styrkjast. Miðjað verður ímóti, at allir tættir í skipanini eru komnir í fasta legu um trý ár.

***

Góðu føroyingar!

»Antin – ella.«

Tað valið gera vit dagliga, eisini hvørja ferð vit orða okkum. Vit kunnu orða okkum antin hóvliga og uppbyggiliga – ella óreiðiliga og meinfýsið.

Millum samgonguna og andstøðuna rúka mangan óreiðilig orð, og vit eru skjót at brigsla hvør øðrum.

»Soleiðis er politikkur bara« verður ofta sagt. Men tað er ikki rætt. Tí tað eru vit, politikarar, sum velja, hvussu politikkur skal vera.

Málið eigur at vera nógv fleiri semjur tvørtur um samgongu og andstøðu. Hetta verður ein týðandi uppgáva fyri komandi 33 tingfólkini at loysa.

Komandi, sigi eg, tí í dag verður valstríðið skotið í gongd.

Og eg veit, hvussu skjótt orðavalið og tónin í valstríðnum kann fara á glið. At tað gerst persónligt, ljótt og skitið – serliga í sosialu miðlunum.

Eg fari tí staðiliga at heita á okkum øll um at tryggja, at vit fáa eitt gott og siðiligt valstríð. At vit virða hvørt annað – hóast vit í mongum eru rúkandi ósamd.

Og lat meg gera greitt, at talan er um eitt val. Sama hvat tú valdi seinast, royn so at lurta við opnum sinni eftir tí, flokkarnir siga, og ger tær so eina niðurstøðu. Kanska endar tú aftur í sama staði sum undanfarin val. Tað er alt í lagi. So leingi sum tú hevur lurtað eftir møguleikunum og velur eftir tíni egnu samvitsku.

At enda vil eg hjartaliga takka Framsókn og Tjóðveldi fyri samstarvið, og andstøðuni fyri samstarv og gott mótspæl. Eg vil takka Føroya fólki fyri álitið, okkum varð sýnt á seinasta vali og fyri mangar góðar og gevandi løtur kring landið hesi seinastu fýra árini.

Tað hevur verið mær ein stórur heiður at verið tykkara løgmaður.

Eg skal nýta høvi at ynskja øllum flokkum, øllum valevnum og øllum føroyingum góða ólavsøku og gott val.

Gud signi Føroyar.

# ÍSKOYTISPARTUR TIL RØÐUNA

## STJÓRNAR- OG LÓGAMÁL

**Heimsmálini**
Landsstýrið hevur samtykt at arbeiða fram ímóti heimsmálunum hjá ST, á enskum nevnd Sustainable Development Goals Agenda 2030. Málini eru sett fyri tíðarskeiðið 2015 til 2030 og skulu seta eina greiða kós fram ímóti burðardyggari menning til gagns fyri bæði menniskju og náttúru. Endamálið er, at hvørt landið tekur útgangsstøði í egnum veruleika og við egnum raðfestingum virkar fyri at fremja málini. Føroysk týðing er tøk á landsstyrid.fo.
Hagstova Føroya arbeiðir við at gera eina hagfrøðiliga lýsing av Føroyum í mun til Heimsmálini eftir hagtalsleisti hjá ST. Eftir ætlan er hagtalslýsingin tøk næsta ár.

**Yvirtøkur**
Familjurættarliga økið varð yvirtikið á ólavsøku í fjør. Í hesum sambandi varð eisini ein Familjufyrisiting sett á stovn, sum hevur tikið sær av umsitingini av familjumálum, sum áður vóru hjá Ríkisumboðnum. Yvirtøkan hevur eydnast væl og tryggjar, at tað verða føroyingar og okkara Løgting, sum skulu avgera, hvussu hetta týdningarmikla økið, sum røkkur heilt inn í føroysku familjuna, skal skipast og umsitast í framtíðini.

10. desember í fjør samtykti Løgtingið at taka yvir kortmyndugleikan bæði á landi og sjógvi. Við hesum taka føroyskir myndugleikar lóggávuvaldið, útinnandi valdið og fíggjarligu ábyrgdina á málsøkinum kort- og landmátingarmyndugleiki. Kort- og landmátingarmyndugleikin fevnir eisini um sjókort og sjómátingar. 1. apríl var yvirtøkudagurin fyri landkort, og 1. januar 2020 komandi verður sjókortøkið yvirtikið.

**Dagføring og føroyskan av revsilógini** (tingseturnar 2016–2021)
Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa alla revsilógina dagførda og á føroyskum máli.

At dagføra alla revsilógina er eitt sera stórt arbeiði og rættiliga tíðarkrevjandi, og tí er dagføringin av revsilógini býtt upp í hóskandi partar. Hetta ger tað samstundis møguligt hjá landsstýrinum og Løgtinginum at kunna viðgera dagføringarnar betur og gjøllari, bæði málsliga og innihaldsliga.

Í tingsetuni 2016 vórðu reglurnar um kynslig brotsverk í kap. 24 í revsilógini dagførdar, nútímansgjørdar og orðaðar á føroyskum. M.a. varð neyðtøka víðkað til eisini at fevna um annan ólógligan tvingsil, misnýtslu av persóni í hjálparleysum tilstandi ella støðu og samlegu við børn undir 12 ár. Ásetingin um ólógligan tvingsil, misnýtslu av sálarsjúkum og onnur grov misnýtsla varð víðkað til eisini at fevna um brot framt í hjúnalagi. Fyrningarfreistin varð longd fyri ávís brotsverk, og ættleiðing og lívfrøðiligur skyldskapur vórðu javnsett í sambandi við blóðskemd.

Í tingsetuni 2017 vórðu kapitlarnir 25–29 dagførdir og umsettir til føroyskt. Hesir kapitlar fevna um hesi brotsverk: Kapittul 25: Brot móti lívi og likami. Kapittul 26: Brot móti persónliga frælsinum. Kapittul 27: At valda ónáðir og ærumeiðing. Kapittul 28: Fíggjarbrotsverk. Kapittul 29: Serligar ásetingar viðvíkjandi løgfrøðiligum persónum.

Í tingsetuni 2018 vórðu kapitlarnir 14-19 dagførdir og umsettir til føroyskt. Hesir kapitlar fevna um hesi brotsverk: Kapittul 14: Brotsverk ímóti almennum myndugleikum. Kapittul 15: Brotsverk ímóti almennum friði og skilhaldi. Kapittul 16: Brotsverk í tænastu ella starvi hjá tí almenna o.a. Kapittul 17: Følsk frágreiðing og følsk ákæra. Kapittul 18: Gjaldsmiðlabrotsverk. Kapittul 19: Skjalafalsan.

Í komandi tingsetu er klárt at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um dagføring av kapitlunum 12–13 og 20-23 í revsilógini, sum eru teir seinastu kapitlarnir í serliga partinum av Revsilógini. Síðan verður tey næstu 1-2 árini hildið fram við at dagføra kapitlarnar í almenna partinum.

**Persónsupplýsingar og dátuvernd**

ES hevur samtykt eina nýggja Persóndátaforordning, sum er komin í staðin fyri higartil galdandi direktiv 95/46. Fyriskipanin kom í gildi í ES- og EØS-londunum tann 25. mai 2018. Í Føroyum er galdandi løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum í stóran mun er grundað á ES-direktivið 95/46 eins og onnur líknandi lóggáva í Norðurlondum. Við avgerð hjá ES-kommissiónini 5. mars 2010 vórðu Føroyar góðkendar sum trygt triðjaland.

Nú ES hevur fingið nýggja fyriskipan um persónsupplýsingar, mugu vit endurskoða okkara lóggávu um persónsupplýsingar fyri at staðfesta, um tað fer at verða neyðugt at gera broytingar í føroysku lóggávuni, um Føroyar framhaldandi skulu vera góðkendar sum trygt triðjaland.

Lógartænastan er farin undir hetta arbeiðið, og lógaruppskot um nýggja Dátuverndarlóg verður klárt at leggja fyri Løgtingið í heyst.

**Arbeiðið at gera nýggja rættargangslóg fyri Føroyar**

Rættargangslógin fyri Føroyar er rættiliga afturúrsigld í mun til rættargangslógina, sum er galdandi fyri Danmark. Talan er ikki einans um smávegis frábrigdi, men um sera umfatandi og prinsipiellar munir á lóggávunum. Meira enn 200 lógarbroytingar eru gjørdar í donsku rættargangslógini, sum ikki eru settar í gildi fyri Føroyar. Flestu av hesum lógarbroytingum eru grundaðar á nýggja tøkni, fjølbroyting av rættarstøðuni, betring av rættartrygdini og at geva almenninginum betri innlit í arbeiðið hjá dómstólunum. Hetta er sera óheppið, í øllum førum so leingi sum Føroya rættur er ein samfeldur partur av donsku dómstólaskipanini, og hvørs dómar skulu roynast av landsrætti og Hægstarætti.

Eftir áheitan frá løgmanni setti danski løgmálaráðharrin í 2017 ein arbeiðsbólk við umboðum fyri Løgmansskrivstovuna, Føroya rætt, Fútan, Føroya Advokatfelag, Fróðskaparsetrið, Ríkisumboðið, Domstolsstyrelsen, Dommerforeningen og Løgmálaráðið at gera uppskot til eina fullkomna dagføring av rættargangslógini fyri Føroyar. Arbeiðsbólkurin hevur gjøgnumgingið alla lógina, og hevur júst fingið endaligt uppskot frá Løgmálaráðnum.

**Ígildisseting av Politilógini**
Við lógaruppskotinum um ígildisseting av Politilógini verður sett í verk ein grundleggjandi og savnað løggáva fyri vanliga virksemið hjá politinum. Lógin ásetir eisini tær grundleggjandi meginreglurnar fyri valdsnýtsluni hjá politinum sum liði í vanligum skilhaldi. Við Politilógini verða greiðar reglur á hesum øki. Hetta styrkir um rættartrygdina hjá borgarunum, og politiið fær greitt grundarlag at arbeiða út frá í støðum, har politið fyri at kunna røkja sínar uppgávur má fremja inntriv mótvegis borgarum, møguliga við at brúka tvingsil.

**Ígildisseting av PET-lógini**
Endamálið við lógaruppskotinum um ígildisseting av PET-lógini er at fáa nýggja og tíðarhóskandi løggávu um virksemið hjá PET í Føroyum og at seta í verk serstakt eftirlit við tænastuni fyri at styrkja um eftirlitið við viðgerðini hjá PET av upplýsingun um bæði likamligar og løgfrøðiligar persónar.

PET-lógin skal tryggja, at PET ikki uttan at hava viðkomandi og sakliga orsøk til tess savnar, skrásetir ella á annan hátt viðger upplýsingar um borgararnar, heruppií teirra luttøku í politiskum virksemi, og at lógin á hendan hátt skal verja rættartrygdina hjá teimum persónum, sum koma undir kanning o.a. hjá PET. Herumframt skal lógin tryggja tann í einum demokratiskum samfelagi neyðuga opinleikan um og eftirlit við virkseminum hjá tænastuni og tær treytir, sum hon virkar undir, m.a. ta vanligu lutfalsmeginregluna. Uppgávurnar hjá PET í Føroyum fara, eftir at lógin er sett í gildi, framhaldandi í høvuðsheitum at samsvara við tær uppgávur, sum PET frammanundan røkir.

Ætlanin er at uppskotið um nýggja Rættargangslóg umframt lógaruppskot um ígildisseting av Politilógini og PET-lógini skulu vera klár at leggja fyri Løgtingið í heyst.

**Kunngerðir um skráseting av vápnum, vápnaprógv og trygd og goymslu av vápnum**
Í mai 2015 samtykti Løgtingið at broyta vápnalógina soleiðis, at ymisk trygdarátøk vórðu sett inn í lógina, m.a. skráseting av vápnum og vápnaprógv. Í 2016 vórðu neyðugu kunngerðirnar gjørdar, sum fremja hesar lógarbroytingarnar. Kunngerð um skráseting av skotvápnum, kunngerð um vápnaprógv og kunngerð um trygd og goymslu av vápnum eru settar í gildi.

Umhvørvisstovan umsitur vápnaskránna og skrivar út vápnaprógv. Síðan 1. januar 2017 er 6601 vápn skrásett í vápnaskránni hjá Umhvørvisstovuni, sum hevur útskrivað 3299 vápnaloyvi.

Undirvísingartilfar til vápnatrygdarskeið er góðkent, og fyrstu vápnatrygdarskeiðini vórðu hildin á heysti 2016. Í dag eru 9 góðkendir veitarar av vápnatrygdarskeiði, og 20 persónar eru góðkendir sum undirvísarar til vápnatrygdarskeið.

Miljø- og Fødevareministeriet hevur góðkent, at føroyska vápnaprógvið kann brúkast til at fáa útskrivað "gæstejagttegn" í Danmark.

**Nýggj løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing**
Í 2017 varð nýggj lóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing samtykt. Lógin ger tað lættari at verja fólk, sum verða tráfylgd (stalkað) ella órógvað. Eitt nú eru reglurnar um tilhald greiðari, og eisini er møguligt at vísa einum harðligum persóni burtur úr heiminum. Í 2019 varð lógin broytt soleiðis, at orðið "tilhald" varð broytt til "frástøðuboð", og Fútin fekk heimild at taka fyribilsavgerð um frástøðuboð (bráðfeingis frástøðuboð).

**Tryggingaravtalulógin broytt viðvíkjandi brúki av íleguupplýsingum um tryggingartakarar**
Í 2017 varð broyting gjørd í Tryggingaravtalulógini, sum skal forða fyri, at fólk, tá ið ein vanlig tryggingaravtala ella pensjónsavtala verður gjørd, verða noydd at fáa til vega upplýsingar, sum skulu lýsa ein arvafrøðiliga treytaðan váða fyri at fáa sjúkur í framtíðini, og at tryggingarfeløg kunnu nýta slíkar upplýsingar til sín fyrimun. Hetta verjir tryggingartakaran fyri mismuni bæði í sambandi við, at ein tryggingaravtala verður gjørd, og eisini fyri einum møguligum trýsti at lata seg arvafrøðiliga kanna.

**Dagføring av lóggávu, sum er galdandi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum**
Lóggávan, sum er galdandi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum í Føroyum og av føroyskum málum, varð dagførd í 2017. Offentlighedsloven varð sett í gildi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum av føroyskum málum – bæði í Føroyum og í Danmark. Fyri føroyskar myndugleikar er løgtingslóg um alment innlit framvegis galdandi.

Í 2017 varð eisini Lov om behandling af personoplysninger sett í gildi fyri viðgerðina hjá ríkismyndugleikunum av persónsupplýsingum í Føroyum. Fyri føroyskar myndugleikar er løgtingslóg um persónsupplýsingar framvegis galdandi.

**Lógardygd og rundskriv um lógarsmíð**
Seinastu árini hevur verið arbeitt miðvíst við at bøta um dygdina á lóggávuarbeiðinum hjá landsstýrinum.

Tann 1. mars 2015 kom í gildi *rundskriv um uppseting og broyting av løgtingslógum og kunngerðum, um uppseting av ríkislógartilmælum og um uppseting av uppskotum til samtyktar frá landsfyrisitingini*. Hetta rundskrivið var eitt stórt framstig fyri lógararbeiðið hjá landsfyrisitingini.

Lógartænastan hevur seinastu 2–3 árini arbeitt við at endurskoða rundskrivið, sum nú hevur fingið nýtt heiti: Rundskriv um lógarsmíð. Endurskoðanin er gjørd í samráð við Løgtingsumsitingina, og stjórnarráðini hava eisini havt rundskrivið til ummælis. Rundskriv um lógarsmíð kom í gildi 1. januar 2019. Við hesum rundskrivi eru mestsum allir tættir í lógarsmíði nú savnaðir á einum staði.
Endamálið við rundskrivinum er at lætta um lóggávuarbeiðið. Rundskrivið er tí uppsett, so tað kann nýtast sum uppslagsverk. Greitt verður í stuttum frá, hvørji løgfrøðilig atlit skulu havast í huga, og hvussu tey ymisku uppskotini skulu setast upp tøkniliga.

Rundskrivið er ikki galdandi fyri uppskot til løgtingsfíggjarlógir, eykajáttanir, uppskot til samtyktar til játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini, átekningar o.tíl.
Fyri at kunna um innihaldið í rundskrivinum hevur lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eisini havt skeið um lógardygd fyri starvsfólkum í landsfyrisitingini umframt fyri teimum, sum arbeiða við lóggávu á stovnunum, sum stjórnarráðini varða av.

Øll lógar- og kunngerðauppskot skal lógartænastan eftirkannað, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd í Kunngerðablaðnum. Eisini verður ein ársfrágreiðing um eftirkanning gjørd, hvørs endamál er at upplýsa stjórnarráðini um tað, sum lógartænastan í síni eftirkanning er komin fram á, og sum verður hildið at hava almennan áhuga hjá øllum stjórnarráðunum.

**Føroya Kærustovnur skal endurskoðast**
Ein arbeiðsbólkur varð í vár settur at endurskoða bygnaðin á Føroya Kærustovni. Stovnurin er sera nógv broyttur, síðani hann bleiv settur á stovn í 1998. Fleiri kærunevndir eru lagdar afturat, umframt at eisini aðrar nevndir, ið ikki viðgera kærur, eru lagdar til stovnin.
Eftir at hava virkað í 20 ár er tíðin búgvin at fáa eftirmett virksemið og skipanina hjá Kærustovninum. Arbeiðsbólkurin skal við støði í verandi virksemi og skipan gera tilmæli um møguligar broytingar og tillagingar, so stovnurin fer at hóska betur til samfelagið og fyrisitingarbygnaðin í dag.
Arbeiðsbólkurin skal vera liðugur við sítt arbeiði tann 1. mai 2020.

## FISKIVINNU- OG LANDBÚNAÐARMÁL, TILBÚGVING

**Fiskivinnumál**
Nýskipan av fiskivinnuni hevur verið eitt av mest týðandi málunum í øllum valskeiðinum. Málið var eisini eitt av høvuðsmálunum, ið landsstýrið setti sær fyri at fremja frá byrjan av valskeiðinum.

Málið er rokkið. Nýggj lóg, løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, varð samtykt í desember 2017. Nýggja lógin loysir gomlu lógina av, Løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, ið var grundarlagið undir skipan av fiskivinnuni frá 1994 til 2017.

Nýggja lógin hevur til endamáls at:

- Tryggja røkt og lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygga gagnnýtslu av livandi sjófeingi
- At varðveita sjófeingið sum ogn Føroya fólks
- At tryggja besta samfelagsliga íkastið frá vinnuni, ið gagnnýtir sjófeingið
- At stuðla undir arbeiðsmøguleikar og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið

Øll mið og mál, ið sett verða, skulu byggja á ta aðalreglu, at sjófeingið er ogn Føroya fólks og kann hvørki í lóg ella verki gerast privat ogn. Sjófeingið skal tryggja burðardygga grund undir øllum tí føroyska búskapinum.

Í nýggju skipanini er atgongdin til fiskiskap skipað í eina størri breidd enn áður og eggjar til, at fleiri kunnu luttaka í fiskiskapi, virking og sølu av fiski, fiskavørum og úrdráttum. Í høvuðsheitum kann atgongdin lýsast sum fýra møguleikar:

1. Rættindi til vinnuligar royndir og verkætlanir, gransking og rannsóknir.
2. Menningarkvotur til vinnuligar menningarætlanir kring landið.
3. Uppboð. Rættindi verða boðin út á uppboði í 1-árs, 3-ára og 8-ára tíðarskeið.
4. Persónar og feløg, sum í 2017 høvdu rættindi at taka lut í ymsum fiskiskapi, kundu halda fram at gagnnýta somu rættindi, tey undantikin, ið eru skipað til royndir og gransking, menningarkvotur og uppboð.

Innan økið fiskivinnuroyndir og menningarkvotur við meira skal dentur leggjast á virksemi og verkætlanir, ið stuðla undir virðisvøkstur, menning, arbeiðs- og inntøkumøguleikar. Endamálið við skipanini er at stimbra undir størri breidd í atgongdini til sjófeingið. Samstundis skulu vinnufeløg hava víðari møguleikar at leggja virksemið til rættis og laga seg til broytingar, ið altíð koma.

Við hesum sum grundarlag, tað merkir at hava smidligari møguleikar at leggja til rættis, er í nýggju lógini farið frá skipanini við veiðiloyvum, ið kundi virka forðandi fyri smidligari tillaging av skipum og flota.

Partar av nýggju skipanini eru longu settir í verk. Skipanin við uppboði av rættindum hevur virkað í nøkur ár, og skipanin við menningarkvotum er virkin á øðrum ári. Lógarkrav um 100% avreiðing um føroyskan bryggjukant hevur verið virkið síðani 1. januar 2018.

Annar týðandi partur av nýskipanini hevur verið dagføring av skipan um veiðigjøld. Dagføringin byggir á ásetingar um tilfeingisavlop og tilfeingisavgjøld. Verandi lóg um avgjøld – sum fast kilogjald – er ikki nøktandi, tí hon leggur hvørki upp fyri vanligum ella størri broytingum í inntøkum ella útreiðslum í fiskiveiðu. Harnæst fevnir lógin bert um ein lítlan part av samlaða vinnuøkinum.

Landsstýrið hevur evnað til eina nýggja fullfíggjaða lóg, ið leggur upp fyri øll lýti í verandi lóg. Nýggja lógin byggir á søguligt roknskapartilfar um inntøku- og útreiðslugongdina hjá vinnuni. Tilfarið tryggjar, at stuttfreistað frávik javnast út. Harnæst verða inntøku- og útreiðslutøl støðugt stillað við nýggjastu broytingunum í fiskaprísum og útreiðslum til rakstur. Á henda hátt verður tilfeingisgjaldið altíð ásett í røttum lutfalli í mun til tað veruliga og dagførda avlopið hjá vinnuni. Í stuttum leggur skipanin upp til hendan leistin: hevur vinnan eitt tilfeingisavlop, so verður tilfeingisgjald goldið. Hevur vinnan onki tilfeingisavlop, verður onki avgjald goldið.

Uppskotið varð lagt fyri Tingið seint í valskeiðinum, men tað eydnaðist ikki landsstýrinum at fáa uppskotið samtykt. Tó er greitt, at uppskotið hevur ruddað fyri, soleiðis at grundarlag nú er fyri – til fulnar at fáa eina rættvísa tilfeingisskattaskipan tíðliga í næsta valskeiði. Uppskotið tryggjar eitt rættvíst býti av tilfeingisavlopinum millum vinnu, manningar og land.

Seint í valskeiðinum fór fram ein serstøk viðgerð av botnfiskiskapinum við Føroyar við atliti at veiðu og vísindaligari ráðgeving. Ítøkiliga endamálið var at gera eina umsitingarætlan fyri tey mest týðandi botnfiskasløgini við Føroyar. Umsitingarætlanin skal vera karmurin um fyrisitingina av fiskidaga-skipanini. Ætlanin ásetir reglur og mannagongd fyri, hvussu vit áseta tal av fiskidøgum. Málið er, at vit gagnnýta fiskastovnarnar burðardygt lívfrøðiliga og búskaparliga.

Eitt av nýbrotunum í umsitingarætlanini er, at ásett verður ein veiðiregla, sum sigur, hvussu fiskidaga-talið verður ásett. Málið er at stýra fiskiskapinum, so at vit eru innan fyri ásett mørk. Veiðireglan leggur upp til, at tað ikki skal vera neyðugt at hækka ella lækka dagatalið á hvørjum ári. Hetta skal bert gerast, um fortreytirnar við fiskastovnunum ella lutfallið millum veiðu og fiskastovn broytast munandi.

Umsitingarætlanin hevur stóran týdning, tá ið føroysk feløg selja fiskavørur á altjóða marknaðinum. Gongdin hesi seinastu mongu árini hevur verið, at fiskakeyparar og brúkarar krevja góðkenning fyri, at fiskur og fiskavørur hava uppruna í burðardyggum fiskiskapi. Umsitingarætlanir kunnu tryggja týðandi grundarlag fyri nevndu góðkenning og slóða fyri, at føroyskar vørur koma á teir marknaðir, ið geva besta prísin.

Í mai 2019 handaði ein samdur arbeiðsbólkur landsstýrismanninum umsitingarætlanina. Arbeiðið er eitt sera týðandi stig móti burðardyggum fiskiskapi. Arbeiðið byggir á breiða semju ímillum umboð fyri vinnu, fiskifrøði, eftirlit og umsiting. Semja av slíkum slag er at meta sum veruligt nýbrot, ið tryggjar haldgott grundarlag fyri at fremja eina nýggja og dagførda skipan fyri burðardyggari botnfiskaveiðu við Føroyar.

Í altjóða fiskivinnusamstarvi hevur landsstýrið verið miðvíst alt valskeiðið. Rættindi hjá Føroyum eru røkt og ment. Leiðandi umboð úr millum annað russisku og bretsku fiskivinnuumsitingini hava viðgjørt felags mál við føroysku umsitingina. Í sambandi við, at Bretland ætlandi tekur seg úr ES, hevur regluligt samband verið millum føroysku og bretsku fiskivinnuumsitingina.

**Fiskivinnugransking**

Landsstýrið hevur styrkt munandi um fíggjarliga grundarlagið fyri fiskivinnugransking. Fíggjarliga árliga játtanin er hækkað munandi samanborið við undanfarin ár.

Harnæst eru ítøkilig stig tikin fyri skipan av einum granskingargrunni fyri fiskivinnu. Løgtingslóg um Fiskivinnugrunn er samtykt. Játtanin til stovnsfæ er higartil um 13 mió. kr., og verður ætlan landsstýrisins fylgd, so verða 10 mió. kr. aftur játtaðar í 2020. Umframt stovnsfæ er endamálið at tryggja, at eitt fast lutfall av inntøku frá uppboðssølu av veiðirættindum skal flytast í henda grunn og árlig játtan á fíggjarlógini. Sambært lógini kann grunnurin taka ímóti stuðli og fígging frá øðrum. Ætlandi skal grunnurin skipast í deplar kring landið.

**Fiskirannsóknir**
Í hesum valskeiðinum tók landsstýrið avgerð um at byggja nýtt rannsóknarskip. MEST stendur fyri arbeiðinum. Skrokkurin verður tó bygdur uttanlands og motorar settir í. Øll stigini í byggingini hareftir verða gjørd í Føroyum. Skipið skal latast eigaranum í 2020.

Nýggja skipið tryggjar, at Føroyar hava ognað sær eitt sera framkomið rannsóknarskip, ið beinleiðis er bygt til endamálið. Skipið styrkir okkara arbeiði við rannsóknum bæði á egnum øki og ikki minst í altjóða samstarvi. Arbeiðið við rannsóknum og gransking fær til vega tað tilfar, ið er grundarlag fyri tí ráðgeving, stovnurin letur myndugleikum við best skynsomu gagnnýtslu fyri eyga.

**Landbúnaður**
Játtanin til ítøkiligt virksemi er økt seinastu árini. Stráfóðurstuðul, sum fyrstu árini varð fíggjaður úr Búnaðargrunninum, er nú skipaður sum vanligur stuðul. Serstøk fíggjarorka er raðfest til at menna grønmetisframleiðslu, taka ímóti ull og basa djórasjúku.

Búnaðargrunnurin og Búnaðarstovan viðgera serstøk stig, ið skulu stimbra undir velting og nýdyrking. Í hesum sambandi hevur Búnaðarstovan eisini latið úr hondum tilfar, ið ítøkiliga lýsir, í hvussu stóran mun verandi velta lendið verður gagnnýtt.

**Tilbúgving og veðurtænasta**
MRCC (Sjóbjargingarstøðin) hevur ábyrgdina av íverksetan og samskipan av leiting og bjarging á føroyskari havleið. Í hesum valskeiði eru nýíløgur gjørdar og grundleggjandi ábøtur framdar á tekniska útbúnaðin.

Tilbúgving Føroya er dagførd seint í 2017. Talan er um bókling, ið lýsir ábyrgd og uppgávur hjá myndugleikum og øðrum. Somuleiðis verða mannagongd og grundreglur, sum øll tilbúgvingin skal byggja á, lýstar. Allir týðandi partar í yvirskipaðu tilbúgvingini hava luttikið í arbeiðinum, soleiðis at partarnir hava felags fatan av, hvussu tilbúgvingin virkar. Harumframt er yvirskipað tilbúgvingarætlan gjørd fyri Føroyar, ið skal vera grundarlag fyri tvørfakligari kreppustýring í sambandi við størri hending ella kreppu á sjógvi ella landi.

Í 2018 var aðalorðaskifti á Løgtingi um tilbúgvingina. Orðaskiftið og frágreiðingin til orðaskifti tryggja eins og Tilbúgving Føroya eitt gott grundarlag fyri møguligari dagføring av lógini í komandi valskeiði.

Í brátt farna valskeiði hevur ein arbeiðsbólkur mannaður við serkønum skrivað frágreiðing og tilmæli um dagførda, nøktandi og útbygda veðurtænastu í Føroyum. Frágreiðingin er handað landsstýrinum í 2019. Í sama viðfangi er sáttmálin millum landsstýrið og DMI um keyp av veðurtænastum endurskoðaður. Serkunnleikin, ið læt frágreiðingina úr hendi, endurskoðaði sáttmálan.

Tøka tilfarið og endurskoðan av sáttmála lýsir økið væl við tí fyri eyga at menna ein dagførdan føroyskan veðurstovn. Mett verður, at fyrireikandi arbeiðið nú er so fullfíggjað, at nýggi veðurstovnurin kann setast á stovn tíðliga í einum komandi valskeiði.

# FÍGGJAR- OG BÚSKAPARMÁL

Ein av grundarsteinunum undir samgonguskjalinum frá 14. september 2015 var ein varin og langtíðarhaldførur fíggjarpolitikkur við atliti at einum javnari býti av ríkidøminum, øktari virðisskapan og størri sjálvbjargni.

**Búskapurin er vorðin sjálvbjargnari, sterkari og fjølbroyttari**
Sum heild er føroyski búskapurin munandi betur fyri nú enn í 2015. Bæði húsarhald, vinna, kommunur og land hava bjálvað seg fíggjarliga seinastu árini. Samstundis eru íløgur gjørdar, ið betra vælferðina og brynja samfelagið til framtíðina.

Gongdin hevur verið góð seinastu 4 árini:

- BTÚ er økt 17%, ella 2,9 mia. kr. Er nú mett til næstan 20 mia. kr.
- Fólkatalið er økt 5,7%, t.e. 2.800 fleiri íbúgvar. Nærkast nú 52.000 íbúgvum.
- Løntakaratalið er økt 11%, t.e. 2.600 fleiri. Eru nú oman fyri 27.500 løntakarar.
- Arbeiðsloysið er minkað niður í 1,1%. Hetta er søguliga lágt, og arbeiði er til so at siga allar hendur.
- Landskassaskuldin er minkað 1,5 mia. kr.
- Húsarhald hava økt uppsparingina í føroyskum bankum 2,0 mia. kr.
- Vinnulívið hevur havt metstór avlop seinastu árini. Umleið 800 partafeløg eru stovnað, harav 210 eru íverksetarafeløg.
- Inntøkan (BTI) og virðisskapanin (BTÚ) fyri hvønn íbúgva hevur yvirhálað tað í Danmark, samstundis sum skuldin fyri hvønn íbúgva er lægri í Føroyum.
- Ríkisstuðulin hevur verið minkandi partur av samlaðu inntøkunum í Føroyum og er nú bert um 6% av samlaðu almennu inntøkunum.

**Landskassin stór avlop øll árini**
Tá ið samgongan tók við landsins leiðslu, hevði landskassin havt hall 8 ár á rað – samanlagt 3 milliardir krónur – og harvið vaksandi skuld. Hesi gongd setti samgongan sær fyri at venda beinanvegin.

Fyrsta árið í samgonguskeiðnum – árið 2016 – eydnaðist at venda 8 ára gongd við halli á fíggjarlógini til yvirskot. Síðan hava munandi avlop verið øll árini. Samanlagt væntast avlopini í samgonguskeiðnum at gerast minst 1,6 mia. kr. (2016–2019). Til samanberingar vóru hallini í undanfarna samgonguskeiði 1,1 mia. kr. (2011–2015). Munurin er 2,7 mia. kr. rætta vegin.

Í fíggjarlógin fyri 2019 varð mett, at avlopið fyri 2019 verður 377 mió. kr. Men framgongdin og inntøkurnar eru nú størri enn væntað.

**Skuld landskassans er minkað 1,5 milliard**
Tað hevur stóran týdning at minka skuld landsins nú í góðum tíðum. Hetta hevur tí eisini verið eitt av týðandi málunum hjá samgonguni.

- Bruttoskuld landskassan er lækkað úr 5,2 mia. kr. niður í 3,7 mia. kr. Skuldin er minkað 1,5 mia. kr.
- Gjaldførið/uppsparing landskassans er samstundis økt úr 2,2 mia. upp í 2,9 mia. kr. Uppsparingin er økt 0,7 mia. kr.
- Nettoskuld landskassans (lánsbrævaskuld frádrigið gjaldføri) er lækkað úr 3,0 mia. kr. niður í 0,8 mia. kr. Ein samanløgd minking av skuld og øking av uppsparing á 2,2 mia. kr.

Sostatt er skuldarbyrða landskassans í dag minkað munandi og er nú sera lág samanborið við flestu onnur lond. Samlaða almenna føroyska bruttoskuldin (land og kommunur) samsvarar við 24% av BTÚ. Í Evropa er tað í miðal 85% av BTÚ. Hyggja vit at grannalondum okkara, so er skuldin í Danmark 34% av BTÚ, og í Íslandi 43% av BTÚ.

Av avlopi landsins seinastu árini er valt at nýta umleið 2/3 av avlopinum til at minka skuld landsins. Um 1/3 av avlopinum verður brúktur til at spara upp – og harvið eisini styrkja gjaldføri landsins – í Búskapargrunni Føroya.

**Búskaparliga sjálvbjargnari nú enn áður**
Eitt av aðalmálunum hevur verið at gera Føroyar so sjálvbjargnar sum møguligt. Avgjørt varð tí beinanvegin at avtaka árligu javningina av ríkisveitingini, sum undanfarna samgonga setti í verk. Ein avtala varð undirskrivað við donsku stjórnina hesum viðvíkjandi fyri árini 2016–2019, og hevur ríkisstuðulin soleiðis verið fastfrystur.

Samstundis eru inntøkur landskassans øktar 1,2 mia. kr. árini 2015–2019. Hetta samsvarar við eina upphædd, ið er nærum tvífalt so stór sum ríkisstuðulin, ið er 642 mió. kr.

Ríkisstuðulin er tí nú metlágur partur av føroyska búskapinum og av samlaðu almennu inntøkunum. Ríkisstuðulin er nú bara 3% av samlaðu framleiðsluni (BTÚ). Og verður hugt at inntøkunum hjá landi, kommunum og sosialum grunnum, ið veita vælferðartænastur til borgarar landsins, eru ikki minni enn 94% av almennu inntøkunum skaptar í Føroyum. Ríkisstuðulin er í dag bara um 6%. Búskaparliga eru Føroyar tí sjálvbjargnari nú enn nakrantíð áður.

**Javnari býti av virðunum – skattalætti, hægri barnafrádráttur, hægri pensjón v.m.**
Eitt annað týðandi aðalmál hevur verið at tryggja javnari býti av landsins virðum. Fleiri átøk eru framd hesum viðvíkjandi seinastu árini.

- Í 2016 varð skattalætti til lág- og miðallønt settur í verk. Hann gav upp í 700 kr. meira at liva av hvønn mánað. Í húski við tveimum miðalinntøkum var talan um 1.400 kr. meira at liva av um mánaðin. Samstundis varð tøkugjaldið á alivinnuna hækkað og somuleiðis tilfeingisgjaldið í uppsjóvarvinnuni. Á henda hátt varð skattalættin fult fíggjaður, samstundis sum virðini vórðu javnari býtt.

- Fólkapensjónistar hava eisini fingið væl meira at liva av. Í fyrsta umfari við átøkum í 2016 og síðan í sambandi við pensjónsnýskipanina. Samanlagt er talan um, at ein stakur pensjónistur uttan aðra inntøku hevur 1.500 kr. meira at liva av um mánaðin eftir skatt í 2019 enn í 2015.
- Fyritíðarpensjónistar hava fingið meira at liva av við átøkum seinastu árini. Ein fyritíðarpensjónistur við lægstu fyritíðarpensjón hevur nú umleið 2.200 kr. meira at liva av um mánaðin eftir skatt enn í 2015. Tey við miðal og hægstu fyritíðarpensjón hava umleið 1.000 kr. meira at liva av um mánaðin eftir skatt í 2019 enn í 2015.
- Stakir uppihaldarar, smábarnafamiljur og lesandi hava fingið munandi fíggjarligan styrk við familjuískoyti, hægri barnafrádrátti og betringum í lestrarstuðli.
- Ein smábarnafamilja við 3 børnum og inntøku undir 320.000 kr. um árið fær nú 36.000 kr. skattafrítt í familjuískoyti um árið.
- Allar smábarnafamiljur við børnum undir skúlaaldri hava fingið 42% hægri barnafrádrátt. Hann hækkaði úr 6.500 kr. upp í 9.200 kr. fyri hvørt barnið.
- Lestrarstuðulin bleiv hækkaður 500 kr. um mánaðin í 2017, umframt at hann varð prístalsjavnaður í 2018. Eisini fáa lesandi á hægri útbúgvingum og á styttri vinnuførleikagevandi útbúgvingum nú studning í 12 mánaðir í mun til 11 mánaðir frammanundan. Harumframt er barnastudningurin hækkaður, og lesandi við børnum kunnu nú fáa familjuískoyti.

Javnari býti av ríkidøminum styrkir samhaldsfestið, tí fleiri fáa lut í framgongdini, og hetta hevur eisini tryggjað, at virðini í størri mun eru komin í umfar og harvið hava skapt enn størri vøkstur og trivnað.

**Styrkt fíggjarligt støðufestið – Landsbanki, Váðaráð og virkin Búskapargrunnur**

Tað hevur stóran týdning ikki bara at hugsa um búskaparliga framgongd her og nú, men eisini um fíggjarligt støðufesti í longdini. Tí eru fleiri tøk tikin fyri at røkka hesum.

- Frá 2017 fór Búskapargrunnurin at virka, og partur av avlopinum verður nú settur til síðis til verri tíðir. Ítøkiliga er talan um 20% av avlopinum upp til 200 mió. kr. og 50% av avlopinum oman fyri 200 mió. kr. Í ár væntast innistandandi í Búskapargrunni Føroya at fara væl upp um 500 mió. kr. Henda upphædd telur eisini við í minstagjaldføri landskassans.
- Eisini er Landsbanki Føroya endurstovnaður, og eitt føroyskt váðaráð er farið til verka. Endamálið er at skapa størri fíggjarligt støðufesti og soleiðis styrkja samfelagið til at taka ímóti framtíðar niðurgangstíðum, ið av og á fara at koma – ikki minst í einum so lítlum búskapi sum tí føroyska.
- Til tess at útjavna sveiggini í inntøkunum frá tilfeingisvinnunum fara allar tilfeingisinntøkur frá ali- og fiskivinnuni nú í Búskapargrunn Føroya. Ein partur fer beinleiðis á fíggjarlógina, og ein partur verður verandi í grunninum og síðan tikin við í fíggjarlógina í 7 ár.

Hesi átøk eru konjunkturjavnandi og styrkja støðufestið.

**Pensjónsnýskipan og frá flatskatti til stigvaksandi pensjónsskatt**

Tað hevur verið átrokandi neyðugt í áratíggju at fremja eina pensjónsnýskipan. Hetta fyri at tryggja øllum pensjónistum eina trygga og góða pensjón nú og fremeftir og fyri at tryggja fíggjarliga haldførið hjá tí almenna í longdini – og harvið hjá vælferðarsamfelagnum.

Umsíðir eydnaðist tað at fáa pensjónsnýskipanina samtykta í 2018.

- Nýskipanin tryggjar, at allir verandi pensjónistar fáa minst 1.000 kr. um mánaðin meira at liva av eftir skatt, og at eisini teir framtíðar pensjónistar, ið ikki hava eina munandi inntøku umframt pensjónina, fáa minst 1.000 kr. meira um mánaðin.
- Pensjónsnýskipanin gerst nú smidligari og einfaldari, eitt nú við møguleikanum at velja at útseta tína pensjón og harvið fáa hægri pensjón, tá ið tú verður pensjóneraður, ella framskundaða pensjón, um tú ert slitin av arbeiðsávum.
- Tey, ið eru av arbeiðsmarknaðinum í eina tíð – eitt nú vegna barnsburðarfarloyvi, arbeiðsloysi ella forsorg – fáa nú eftirlønargjald av veitingunum.
- Mótrokning millum hjún er nú søga. Frameftir verður tað so, at giftir pensjónistar ikki verða mótroknaðir.
- Tann flati 40% pensjónsskatturin er umlagdur til stigvaksandi pensjónsskatt úr 30% upp í 40%. Hetta er ein munandi skattalækking fyri lág- og miðallønt.

Pensjónsnýskipanin fer sum frá líður at betra munandi um haldførið í almenna búskapinum.

**Grønur avgjaldslætti**

Umhvørvisdálking og veðurlagsbroytingar eru millum størstu avbjóðingar okkara. Tí eru stig tikin til at fremja eina røð av átøkum, ið hava til endamáls at stuðla undir grøna orkuskiftið.

- El- og vetnisakfør eru nú uttan bæði skrásetingargjald, mvg og vegskatt. Hetta ger tey munandi bíligari at ogna sær hjá øllum borgarum. Harvið fáa munandi fleiri møguleika at ogna sær hesa loysnina fram um meira dálkandi loysnir.
- Allur vegskatturin er umlagdur til eitt veg- og umhvørvisgjald, ið er knýtt at útláti á akførum.
- Hitaskipanir til bústaðir kunnu nú eisini keypast og setast í sethús uttan mvg. Hetta er ein roynd at gera tað fíggjarliga møguligt hjá øllum at velja sær hesa loysn. Samstundis kann hetta gera Føroyar umhvørvisvinarligari og minni heftar av oljuinnflutningi.

**Talgildur samleiki og talgildar tænastur til allar føroyingar**

Talgildingin er ein týðandi partur av okkara gerandisdegi í dag. Áður hevur vantað ein heildarætlan fyri útbygging av føroyska talgilda undirstøðukervinum. Tað gjørdist tí eitt aðalmál hjá samgonguni at fara undir at menna Talgildu Føroyar.

Verklagslógin um Talgildu Føroyar er samtykt, og arbeitt verður við verkætlanini. Landið hevur samanlagt sett 90 mió. kr. av til verkætlanina árini 2016–2020. Hartil hava privatar og almennar fyritøkur og Tórshavnar kommuna samanlagt sett 37 mió. kr. av til verkætlanina. Endamálið er at geva føroyingum talgildar loysnir, sum kunnu lætta um gerandisdagin, gera vælferðarsamfelagið betri og at styrkja kappingarførið hjá vinnu og landi.

Seinasti parturin av menningini av talgilda samleikanum fer fram nú í ár og komandi ár. Hvør einstakur føroyingur fer at fáa egnan talgildan samleika, og fer hesin samleikin eitt nú at kunna koma í staðin fyri fleiri “log-in” skipanir, ið føroyingar nýta í dag, til gagns fyri bæði borgarar og vinnu.

Sambært ætlan verður nýggi Tænastuportalurin hjá Talgildu Føroyum millum fyrstu tænasturnar, ið føroyingar fara at kunna nýta nýggja talgilda samleikan til. Tænastuportalurin fer at geva borgarum atgongd til allar almennar tænastur, millum annað hjá Taks, Akstovuni og Almannaverkinum. Føroysku bankarnir fara eisini at brúka talgilda samleikan til sínar talgildu tænastur, eitt nú sum atgongd til netbankan.

Ein nýggj virkisskrá og talgilding av galdandi grunddátaskráum eru eisini partar av Talgildu Føroyum, eins og settur er í verk ein talgildur "motorvegur", sokallaða Heldin, sum fer at gera alt dátasamskiftið millum stovnar, fyritøkur og borgarar tryggari og lættari at menna hereftir.

**Fleiri bústaðir og fjøltáttaðan bústaðarmarknað**
Stóri fólkavøksturin seinastu árini hevur givið eina stóra bústaðaravbjóðing. Tí eru fleiri átøk framd fyri at møta hesi avbjóðing. Eitt fjøltáttað útboð av bústøðum, serliga íbúðir fyri rímiligan kostnað, lestraríbúðir og bústaðir til fólk við serligum avbjóðingum eru týðandi tættir í at skapa trivnað, fólkavøkstur og at lækka kostnaðarstøðið.

Eitt av fyrstu átøkunum hjá samgonguni var tí at geva Bústøðum heimild at byggja bústaðir fyri 250 mió. kr. afturat teimum, ið vóru í gongd. Bústaðir tóku 70 nýggjar bústaðir í nýtslu í 2018, og roknað verður við 75 nýggjum bústøðum í 2019. Í 2020 verður roknað við 57 nýggjum bústøðum afturat. Við hesum fara Bústaðir at hava samanlagt 394 leigubústaðir, harav minst fimta hvør íbúð er latin Almannaverkinum.

Hundraðtals bústaðir standa tómir meginpartin av árinum. Fyri at fáa bústaðaravbjóðingina skjótt loysta (tí tað tekur tíð at byggja), er skatturin fyri at langtíðarútleiga lækkaður munandi. Hetta skal gera tað áhugavert hjá fólki at langtíðarútleiga – heldur enn at stutttíðarútleiga til ferðafólk ella als ikki at leiga út. Tó loysir hetta bara avmarkaðan part av bústaðaravbjóðingini. Tað almenna skal ikki loysa hesa avbjóðing einsamalt. Tað er og verður neyðugt, at tað privata og aðrir partar eisini fremja átøk at loysa bústaðaravbjóðingina.

**Varskógvaraskipan fyri starvsfólk hjá landinum**
Tað almenna røkir týðandi tænastur vegna fólk og land. Í mongum førum er talan um tænastur, ið hava beinleiðis við vælferðina hjá einstøkum borgarum at gera. Tíðin er komin til, at vit gera eins nógv fyri at skapa trygd um tænastur til borgaran, og gjørt verður fyri at skapa trygd um fíggjargeiran. Fyri at styrkja fíggjargeiran og fíggjarliga støðufestið er sett í verk lógarkrav um, at starvsfólk, ið virka í fíggjargeiranum, skulu kunna boða frá møguligum óreglusemi til ikki minni enn tvær varskógvaraskipanir: Eina innanhýsis og eina hjá fíggjareftirlitinum.

Nú er eisini løgtingslóg um varskógvaraskipan fyri starvsfólk hjá landinum samtykt og sett í verk. Endamálið er at økja rættartrygdina.

**Sáttmálasamráðingarnar eru komnar á mál**
Flest allir sáttmálar á almenna arbeiðsmarknaðinum gingu út 1. oktober 2017. Komið er á mál við øllum lønarsáttmálum. 16 av gjørdu sáttmálunum eru tvey ára sáttmálar, sum ganga út 1. oktober 2019. 10 sáttmálar eru trý ára sáttmálar, ið ganga út 1. oktober 2020.

Landsstýrið hevur ælað at betra ásetingarnar um barnsburðarfarloyvi í øllum sáttmálunum. Nú verður tryggjað, at allar kvinnur, ið eru við barn, hava rætt til ásettu barsilstíðina eftir barnsburð, sama um tær hava verið í barnsburðarfarloyvi fyri vanliga tíð av serligum orsøkum.

Eisini eru ásetingar um, at almennir leiðarar skulu gera meira fyri at fyribyrgja strongd og at taka starvsfólkini enn meira við í broytingartilgongdum.

**Bankalóggávan herd**
Tað hevur stóran týdning, at føroysku peningastovnarnir eru fevndir av lóggávu, ið samsvarar við lóggávuna í teimum londum, sum vit vanliga samstarva við, og í Evropa sum heild. Arbeitt hevur verið støðugt við hesum, og lóggávan fyri føroysku bankarnar er dagførd í fleiri umførum. Úrslitið er, at bankarnir hava fingið munandi herd krøv – m.a. til egnar "bjargingarloysnir", um tað skuldi gingið galið fyri bankan – og eisini er ein røð av øðrum krøvum herd. Hetta fyri at bjálva bankarnar enn betur til at standa ímóti broytingartíðum í framtíðini.

**Tryggja, at virðisskapan í Føroyum kemur føroyingum til góðar**
Til tess at styrkja eftirlitið við, at virðisøking í Føroyum kemur føroyska samfelagnum til góðar, eru stig tikin til at herða eftirlitið við transfer-pricing og tunn-kapitalisering í skattalóggávuni. Hetta hevur saman við størri luttøku í altjóða skattasamstarvi og øðrum lóggávubroytingum verið við til at tryggja, at virðisskapan í størri mun kemur føroyingum til góðar nú og frameftir.

**Nýggj og betri hagtøl fyri arbeiðsmarknað, tey 17 Heimsmálini og tjóðarroknskap**
Ein meira dagførdur tjóðarroknskapur hevur verið millum høvuðsraðfestingarnar seinastu árini, og síðan 2015 eru nú komin fýra ár afturat av tjóðarroknskapi. BTÚ var tá tøkt til 2013 og er nú tøkt til og við 2017. Í ár væntast endaliga uppgerð av BTÚ fyri 2018 eisini at verða tøk. Tá hevur tjóðarroknskapurin ongantíð verið betur dagførdur.

Føroyar hava ikki havt hagtøl fyri arbeiðsmarknaðin og lønarviðurskifti. Fíggjarmálaráðið setti 1 mió. kr. av til at fáa hesi hagtøl í rættlag. Samstarv er samstundis sett í gongd millum Fíggjarmálaráðið, Samferðslumálráðið, Hagstovuna, Vinnuhúsið og fakfeløgini um at fáa nýggj lønar- og arbeiðsmarknaðarhagtøl. Arbeiðið er komið væl áleiðis og verður væntandi tøkt komandi ár.

Tey 17 Heimsmálini eru eitt týðandi gjøgnumbrot fyri at røkka einum burðardyggari heimi fyri øll. Eisini Føroyar skulu taka ábyrgd í hesum arbeiði. Játtan er tí sett av til at menna hagtøl í Føroyum fyri øll tey 17 Heimsmálini. Harvið kann okkara ískoyti til tey 17 Heimsmálini eisini síggjast í hagtølum í Føroyum og í altjóða høpi.

**Virkið altjóða samstarv**
Týðandi stig eru tikin fyri í størri mun at luttaka í altjóða skattasamstarvi. Føroyar hava fingið limaskap í Global Forum, og í desember 2018 fingu Føroyar limaskap í BEPS, altjóða skattasamstarvinum, ið snýr seg um at samstarva um skattaupplýsingar tvørtur um landamørk og soleiðis fyribyrgja skattaskjól kring heimin. Harvið eru Føroyar vorðnar limur í báðum teimum stóru altjóða skattasamstørvunum í samgongutíðarskeiðnum.

Eisini tóku Føroyar stig til at dagføra norðurlendska tvískattasáttmálan soleiðis, at Føroyar hava størri ræsur til at leggja okkara skattapolitikk til rættis nú og frameftir.

Nýggjasta altjóða samstarvið er við Katalonia. Í februar 2019 undirskrivaðu Føroyar og Katalonia eitt Memorandum of Understanding viðvíkjandi samstarvi um talgilding. Hetta kann geva báðum pørtum atgongd til nýggja vitan og royndir og leggur lunnar undir økt samstarv millum tjóðirnar.

**Oyggjaleikirnar aftur til Føroya**
Vit vilja fáa Oyggjaleikirnar aftur til Føroya. Tí eru stig tikin til at gera og samtykkja løgtingslóg, ið ásetir, at landsstýrið veitir fíggjarliga trygd fyri, at Føroyar kunnu bjóða seg fram sum vertir fyri Oyggjaleikum. Hetta hevur gjørt tað møguligt hjá Føroyum umvegis ÍSF at bjóða seg fram sum vertir, og vónandi koma Oyggjaleikirnir aftur til Føroyar í næstu framtíð. Hetta fer at fáa stóran týdning fyri okkara ítróttarfólk, ferðavinnu og marknaðarføring av Føroyum og føroyskum vørum og tænastum.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL

**Handil við umheimin**
Ein stórur partur av teimum vørum, sum verða framleiddar í Føroyum, verður framleiddur við útflutningi fyri eyga, og ein stórur partur av teimum vørum, sum føroyingar brúka, verður innfluttur. Tí eru Føroyar knýttar at marknaðum í øðrum londum í størri mun enn lond við størri heimamarknaði. Samhandil við umheimin er tískil ein snúningsásur í føroyska búskapinum og ein fortreyt fyri vøkstri og menning í Føroyum.

ES er framvegis størsti einstaki marknaðurin fyri føroyskar útflutningsvørur. Í virði er útflutningurin til ES vaksin nakað seinastu 10 árini, men lutfalsligi marknaðarluturin hjá ES er kortini minkaður munandi. Hetta kemst av, at føroyskar fyritøkur hava økt um søluna til aðrar marknaðir – serliga Russland, men eisini Kina og USA.

Russland er tað landið, sum innflytur mest úr Føroyum, og Bretland er tað land í ES, sum keypir flestar føroyskar vørur, tilsamans sløk 10 prosent av øllum útflutninginum. Aftur at teimum teljast Danmark, USA og Kina millum fimm teir størstu innflytararnar av føroyskum vørum. Hetta er ein grundleggjandi broyting í samhandlinum hjá Føroyum samanborið við fyri bara 10–15 árum síðan, tá at kalla allur útflutningurin fór til ES.

Mynstrið í innflutninginum hevur víst seg støðugari enn útflutningsmynstrið. Føroyar innfluttu fyri 7,7 milliardir krónur í 2018, og verður nógv mest, 2,8 milliardir krónur, flutt inn úr Danmark. Føroyar hava soleiðis á leið 2 milliardir í halli í samhandlinum við Danmark.

Broytta útflutningsmynstrið krevur, at landsstýrið leggur nógva orku í at virka fyri fleiri fríhandilssáttmálum við nýggjar marknaðir.

Sáttmálin við Turkaland varð lagdur fyri Løgtingið í 2016 og kom í gildi 1. oktober 2017.

Eitt annað stig var semjuskjalið millum Føroyar og Evro-Asiatiska Búskaparsamveldið (EABS), sum vit undirskrivaðu í august í fjør. Skjalið er eitt grundarlag at byggja ein fríhandilssáttmála á. Vit arbeiða áhaldandi við at sannføra bæði EABS og limalondini um at byrja fríhandilssamráðingar við Føroyar.

Í januar í ár undirskrivaðu Føroyar ein fríhandilssáttmála við Bretland. Hann tryggjar, at samhandilin við ein av okkara størstu samhandilspørtum kann halda fram, um Bretland fer úr ES.

Nógv samband hevur verið millum føroyskar og japanskar myndugleikar seinastu árini. Á fundi í Tokyo millum japanska uttanríkisráðharran og landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum í fjør varð komið ásamt um, at londini skuldu fara undir at fyrireika tilgongdina at gera ein fríhandilssáttmála. Óformligar samráðingar fara fram í løtuni millum partarnar, men slíkar tilgongdir vísa seg ofta at vera drúgvar.

Í næstum lata vit upp sendistovu í Beijing. Hon er liður í áhaldandi arbeiðinum at útvega Føroyum betri marknaðaratgongd á kinesiska marknaðinum. Samstundis skal sendistovan eisini røkja okkara áhugamál í m.a. Japan, Vietnam og Suðurkorea, har stórir vakstrarmøguleikar eru fyri føroyskan útflutning og samstarv annars.

Útlit eru fyri, at vit fáa ein heilsufrøðiligan sáttmála við Brasil í 2020. Sáttmálin fer at gera tað møguligt aftur at útflyta fisk og fiskaúrdráttir til Brasil.

**Marknaðarføring av føroyskum vinnulívi í útheiminum**

Ein serstøk játtan hevur í hesum samgonguskeiðinum verið á fíggjarlógini til marknaðarføring av føroyskum vinnulívi úti í heimi.

Í samstarvi við vinnuna hava fleiri vinnu- og handilsferðir verið fyriskipaðar seinnu árini, millum annað í Íslandi, Kina, Turkalandi og Russlandi. Eisini hava átøk saman við vinnuni verið í Armenia, í Brússel, í Moskva, í Keypmannahavn og í London.

**ES**

Arbeitt verður áhaldandi við at taka burtur avmarkingar í handilssáttmálanum við ES. Tær eru serliga ein forðan fyri nýskapandi vinnulívsfólk, ið vilja royna onkra nýggja framleiðslu.

Umframt at virka fyri frælsari marknaðaratgongd hevur stórur dentur verið lagdur á at styrkja yvirskipaða samstarvið við ES. Ein tvørgangandi samstarvskarmur kundi verið við til at lagt upp til betri samskipan og samskifti, har samstarv longu er, og eisini slóðað fyri nýggjum samstarvsmøguleikum millum ES og Føroyar.

**EFTA**
Føroyar hava í fleiri ár roynt at fingið limaskap í EFTA. Vit hava tó ásannað, at áhugin millum EFTA-limalondini fyri føroyskum limaskapi er misjavnur. Vit eiga kortini ikki heilt at sleppa ynskinum um at fáa EFTA-limaskap. Broytingar kunnu hugsast at fara fram í evropeiskum samstørvum, m.a. orsakað av Brexit; møguleikin kann tí ikki útihýsast, at byltingar í Evropa kunnu blása nýtt lív í EFTA-felagsskapin.

**Ísland – Hoyvíkssáttmálin**
Við løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, ið Løgtingið samtykti 18. desember 2017, skulu allir eigarar av teimum feløgum, sum fáa og varðveita veiðurættindi, vera skrásett í Føroyum frá 1. januar 2022. Nýggju treytirnar gera tað truplari hjá útlendskum likamligum persónum at fara undir virksemi í føroysku fiskivinnuni við at eiga í føroyskum feløgum.

Tá ið tað gjørdist greitt, at tað ikki fór at eydnast at gera eina hóskandi semju við íslendsku stjórnina um at gera neyðugar tillagingar í Hoyvíkssáttmálanum til tess at tryggja samsvar millum sjófeingislógina og altjóða sáttmálaskyldur Føroya, varð tískil neyðugt hjá landsstýrinum at biðja Løgtingið um heimild at seta Hoyvíkssáttmálan úr gildi. Sáttmálin varð sagdur upp tann 31. desember í 2018 til at fara úr gildi 1. januar komandi ár.

Føroyar hava mótvegis Íslandi skotið upp at fara undir samráðingar um ein nýggjan handilssáttmála millum londini, soleiðis at vøruhandilin kann halda fram eins og higartil eftir 1. januar 2020. Eydnast tað ikki at koma á mál, verður kortini ikki mett, at samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar fara at hava stórvegis týdning.

**Trygdarviðurskifti**
Í nøkur ár hevur spenningurin aftur verið vaksandi millum eystur og vestur. Hernaðarliga virksemið um okkara leiðir er økt, og fleiri av heimsins stórveldum sýna Arktis og Norðurhøvum alsamt størri áhuga. Í hesum samanhangi kann strategiska støða Føroya í miðjum Norðuratlantshavi vera áhugaverd. Vísandi til bæði Løgtingssamtyktina frá 2004 og til Fámjinsskjalið hevur landsstýrið í fleiri førum mótvegis donsku stjórnini víst á, at tørvur er á betri kunning um trygdarpolitisk og verjupolitisk mál. Eitt úrslit av hesum er, at arbeitt nú verður við at leggja lunnar undir mannagongdir, sum kunnu tryggja, at føroyskir myndugleikar verða kunnaðir og í størri mun tiknir við upp á ráð og luttaka, tá ið avgerðir verða tiknar í trygdar- og verjupolitiskum spurningum, sum eru viðkomandi fyri Føroyar.

**Arktis og Útnorður**

Arktiska økið, og harvið eisini Útnorður, er vorðið ein miðdepil í einum nýggjum geopolitiskum veruleika. Við veðurlagsbroytingunum og bráðnandi ísinum í Arktis fær økið alsamt vaksandi búskaparligan og geopolitiskan týdning, og tað merkist, at heimssamfelagið í størri og størri mun vendir eyguni norðureftir.

Sum karmur um økissamstarv eru Arktiska Ráðið og Útnorðurráðið týdningarmeiri enn nakrantíð. Føroyar hava nógv í felag við hini samfeløgini í Arktis, serliga hvat viðvíkur búskapargrundarlagi, nærleika við náttúruna, mentan og avbjóðingar í sambandi við at tryggja fólkavøkstur og burðardygga menning. Hetta vóru eisini høvuðsevnini á arktisku ráðstevnuni, Arctic Hubs, sum landsstýrið saman við Arctic Circle skrivstovuni skipaði fyri í Norðurlandahúsinum í mai 2018, har luttakarar úr øllum heiminum vóru við.

**Menningarsamstarv og neyðhjálp**

Menningarsamstarv og neyðhjálp hava havt fremstu raðfesting hjá landsstýrinum, og játtanin er fleirfaldað seinnu árini, úr trimum upp í níggju milliónir um árið. Økta játtanin er ein liður í hugsjónini um, at Føroyar sum eitt ríkt og framkomið land skulu taka størri ábyrgd í altjóða samfelagnum og vera við til at menna og hjálpa, har møguleikar og tørvur eru.

Arbeitt hevur verið við at menna ein nýggjan leist at skipa leiklut Føroya í altjóða menningarsamstarvi og neyðhjálp meira miðvíst eftir, soleiðis at tað í størri mun verða føroysk vitan og føroyskir førleikar heldur enn bara føroyskir pengar, ið standa fyri føroyska íkastinum í altjóða menningarsamstarvi og humaniterum arbeiði.

Tey 17 Heimsmálini hjá Sameindu Tjóðum eru stavnhald Føroya í menningarsamstarvi. Landsstýrið metir tað vera skilabest at leggja dent á mál 14, ið snýr seg um lívið í sjógvi og vatni – eitt øki, har Føroyar eru millum fremstu lond í heiminum viðvíkjandi menning og nýskapan og tí kunnu veita eitt munadygt íkast. Men Føroyar eru eisini framkomin tjóð á øðrum økjum, sum tørvur er á í menningarsamstarvi. Útbúgving, góð heilsa og javnrættindi, sum eisini eru grundleggjandi fortreytir fyri burðardyggari menning eru tí eisini raðfest menningarmál.

Landsstýrið hevur í januar 2019 gjørt eina samstarvsavtalu við Reyða Kross, sum hevur við sær, at ein partur av játtanini til neyðhjálp verður latin Reyða Krossi at brúka til tað humanitera arbeiðið, sum felagsskapurin ger runt um í heiminum.

**Uttanríkispolitiska lógin**

Landsstýrið setti sær fyri í samgonguskjalinum, at uttanríkispolitiska lógin skuldi endurskoðast við tí endamáli at taka burtur avmarkingar og forðingar.

Eftir avtalu við donsku stjórnina varð settur ein felags føroyskur-danskur embætisbólkur at arbeiða við málinum. Tíverri eru í løtuni ikki útlit til, at nevniverd framstig fara at koma burtur úr hesum arbeiði.

Frá føroyskari síðu hevur verið víst á, at Føroyum tørvar víðari uttanríkispolitiskar heimildir, og at siðvenja serliga á fiskiveiðiøkinum hevur verið fyri at gera avtalur í egnum navni. Eisini hevur verið víst á, at uttanríkispolitiska lógin er óheppið haft um beinini á føroysku tjóðini, tí hon flættar føroysk og grønlendsk áhugamál saman. Vísandi til m.a. áður gjørdar yvirtøkur hevur eisini verið ført fram, at um vilji er til tess, kunnu útvegir finnast fyri at víðka um uttanríkispolitisku heimildir Føroya, nú sjónligar áneyðir eru fyri hesum.

Frá danskari síðu verður tvíhildið um, at við uttanríkispolitisku lógini frá 2005 hava føroyskir myndugleikar fingið so víðar heimildir á uttanríkisøkinum, sum tað yvirhøvur ber til at fáa innan fyri grundlógarinnar karmar. Sambært fatanini hjá donsku stjórnini er danska ríkið eitt eindarríki, og eindarríkisfatanin forðar sambært donsku stjórnini fyri, at Føroyar kunnu gera sáttmálar í egnum navni. Vit halda, at tað eigur at vera rúm fyri, at føroyskir myndugleikar fáa størri virkisføri innan fyri verandi ríkisrættarligu karmar, men um grundlógin er ein forðing fyri hesum, er spurningurin, um tíðin er komin til, at stig verða tikin til at nútímansgera samstarvið við Danmark í einum nýggjum tíðarhóskandi og meira javnbjóðis felagsskapi uttan fyri grundlógina.

**Norðurlandamál**
Royndir hava verið gjørdar at vinna Føroyum sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum og í Norðurlendska ráðharraráðnum (NMR). Landsstýrið hevur havt stórt fokus á hetta arbeiðið tey seinastu árini, men higartil hava royndirnar ikki borið á mál. Víst hevur verið til Helsingforssáttmálan, ið er grundarlagið undir norðurlendska samstarvinum, og nú eisini til ríkisrættarligu støðu Føroya sum forðingar fyri sjálvstøðugum føroyskum limaskapi.

Landsstýrið og danska stjórnin hava samskift um ein leist fyri møguligum føroyskum a-limaskapi í norðurlendska samstarvinum. Ætlanin hevur so verið at leggja henda leistin fyri hini norðurlondini. Higartil hevur tó ikki borið til at finna semju, ið leggur nakað nevnivert afturat teirri umboðan, sum Føroyar hava í verandi skipan.

Danmark er formansland í norðurlendska ráðharraráðnum (NMR) í 2020. Sum lið í ætlanunum um størri føroyska luttøku í norðurlendskum samstarvi fara Føroyar at standa fyri formansskránni á ráðharraøkjunum orkumálum og fiskivinnumálum.

## VINNUMÁL

**Alilóggávan endurskoðað**
Alivinnan í Føroyum er millum tær fremstu í heiminum, og fyri framhaldandi at styrkja haldførið og kappingarførið í vinnuni hevur samgongan samtykt løgtingslóg um aling av fiski v.m. Tað er fyri at skapa størri vøkstur og menning í alivinnuni umframt at fáa greiðari karmar um eigaramarkið, útlendskan kapital og nýtslu av firðum og sundum. Alilóggávan gevur eisini landsstýrismanninum greiðari heimildir yvirskipað at hava tamarhald á gongdini í alivinnuni.

**Lúsaplágan minkað**

Lúsatrupulleikin er framvegis ein avbjóðing í alivinnuni. Við broyttu lúsakunngerðini hevur samgongan roynt at minka útbreiðsluna av laksalús, so skaðaárinið á fisk í aliútbúnaði og á villan fisk verður sum minst. Lúsakunngerðin skal eisini minka um og niðurberja mótstøðuførið hjá laksalús. Vinnan hevur framt nógv munagóð átøk fyri at týna lúsapláguna, og úrslitini síggjast. Landsstýrið er farið undir at endurskoða lúsakunngerðina, og ætlanin er millum annað at lækka markvirðið líðandi niður í 0,5.

**Arbeiðspláss skapt í Suðuroy**

Ásannandi, at tørvur er á serligum tiltøkum fyri Suðuroynna, eru í alilóggávuni serligar reglur skipaðar um, at alifiskur frá alibrúkum í Suðuroy skal virkast í oynni. Tað er fyri at skapa fleiri arbeiðspláss og størri virksemi í oynni.

**Fiskaaling fótað sær**

Fiskaaling hevur fótað sær aftur bæði rakstrarliga og fíggjarliga. Við øktum partapeningi er virksemið tillagað og miðsavnað um at granska, menna, ráðgeva og veita tænastur um gagnnýtslu av alifirðum, aling á landi, fiskavælferð, lús og smittuspjaðing og nýggja framleiðslu. Hetta er samstundis ein liður í at seta í verk Heimsmálini fyri burðardygga menning. Eisini er sáttmáli undirskrivaður við Bakkafrost, sum hevur yvirtikið ábyrgdina av føroysku lívfiskaætlanini, so føroyska laksastamman verður varðveitt.

**Leita eftir olju**

Vaksandi sannlíkindi eru fyri at finna kolvetni í føroyskum øki. Løgtingslóg um fimta útbjóðingarumfar varð einmælt samtykt í Løgtinginum, og Jarðfeingi er farið undir at fyrireika fimta útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetni í føroyskum øki. Stórar oljukeldur og mesta virksemið í bretskum øki eru á markinum við føroyska landgrunnin, sum gevur góðar vónir um at finna kolvetni í eini keldu, sum røkkur tvørtur um markið millum bæði londini.

**Ferðavinnan veksur**

Ferðavinnan hevur verið raðfest frammarlaga í hesum samgonguskeiðnum. Umsetningurin er nú slakar 703 milliónir krónur, og 640 ársverk eru í vinnuni. Talið á ferðafólkum veksur støðugt, tilboðini til ferðafólk mennast, og stórar útbyggingar av hotellum eru farnar av bakkastokki. Stóri vøksturin í ferðavinnuni gevur nýggjar møguleikar fyri inntøku og virksemi í øllum landinum. Við framburðinum koma eisini nýggjar avbjóðingar. Náttúran og mentanin eru ríkasta tilfeingið, vit eiga, og sum grundarlag undir ferðavinnuni skal tað røkjast og troytast við skili.

Visit Faroe Islands hevur lagt eina menningarætlan fyri ferðavinnuna fram til 2025, og politiska skipanin er farin undir at gera lógarkarmar, ið bæði skulu verja náttúruna og gera greitt, hvussu føroyingar og ferðafólk kunnu ferðast í náttúruni. Onnur átøk eru framd í samstarvi við vinnuna, kommunur og borgarar, m.a. við einsháttaðari skelting og stóra átakinum Closed for maintainance, hvørs endamál var at branda Føroyar sum ferðamál og verja viðkvom ferðavinnustøð.

**Bíligari at flúgva**
Síðani SAS fór at kappast við Atlantsflog á Føroyarutuni, er ferðaseðlakostnaðurin minkaður munandi, og tað er ein stórur fyrimunur – serliga fyri tey, sum búgva í Føroyum, men eisini fyri ta alsamt vaksandi ferðavinnuna.

**Lagaligari matstovu- og gistingarhúsvirksemi**
Við løgtingslóg um matstovu- og gistingarhúsvirksemi er lættari at fara undir hesa vinnu, tí reglurnar um loyvisveitan til matstovu- og gistingarhúsvinnuna eru savnaðar í einari lóg. Eftirlitið er eisini broytt soleiðis, at tað er lættari hjá teimum myndugleikum, ið skulu hava eftirlit við vinnuni, at meta um, hvørt ásettar treytir verða hildnar.

**Varðveita og menna matmentanina**
Við broytingunum í matvørulógini er tryggjað, at smáir framleiðarar fáa høvi at selja sína vøru til handlar og matstovur, so føroyskar matvørur eru tøkar hjá flestu okkara, samstundis sum føroyska matmentanin verður varðveitt og ment. Eisini er ein skrásetingarskipan sett í verk, ið skal tryggja, at tað verður lættari at eyðmerkja framleiðarar. Serligu føroysku skipanirnar og føroyska matmentanin hava eisini fingið altjóða viðurkenning og hava vunnið eina røð av virðislønum í altjóða kappingum.

**Umsiting flutt á føroyskar hendur**
Týðandi stig eru tikin á leiðini ímóti at yvirtaka alt útlendingaøkið. Løgtingið hevur samtykt broytingar í útlendingalógini, so Útlendingastovan fer at umsita og taka avgerðir í málum um familjusamanføring, arbeiðs- og uppihaldsloyvi, uppihaldsloyvi fyri lesandi o.a. Við hesum fara føroyskir myndugleikar at byggja upp førleikan at taka avgerðir í málum á útlendingaøkinum. Eisini er tað ein fyrimunur fyri persónar, sum søkja um uppihaldsloyvi, at føroyskir myndugleikar taka avgerðirnar. Hildið verður á við arbeiðinum at yvirtaka alt útlendingaøkið, herundir marknaeftirlitið.

**Integratiónslóg verður fyrireikað**
Farið er undir arbeiðið at fyrireika eina komandi integratiónslóg. Arbeiðið fevnir um betur skipaða undirvísing til útlendingar, at fáa til vega kunningar- og frálærutilfar og at seta sum treyt, at útlendingur skal hava lokið undirvísing í føroyskum máli og samfelagsviðurskiftum fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í Føroyum.

**Vinnufelagalóggávan dagførd**
Fyri at forða fyri, at vinnufelagalóggávan verður misnýtt til skattaskjól og skattaundandrátt, varð lóggávan dagførd í vár. M.a. varð møguleikin at geva út handhavapartabrøv strikaður, tí við slíkum partabrøvum kann eigarin halda seg duldan bæði fyri felagnum og myndugleikum.

**Fyrireika yvirtøku av loftferðsluøkinum**
Tá ið samgongan tók við, varð farið undir tilgongdina at fáa loftrúmið á føroyskar hendur. Semja er fingin við donsku stjórnina um ein leist og tilgongd fyri yvirtøkuna. Í løtuni verða starvsfólk

útbúgvin at røkja loftferðslutænastuna (AFIS-tænastuna) í Vágum, sum Naviair higartil hevur rikið. AFIS-tænastan verður yvirtikin 1. januar 2020. Samstundis sum AFIS-tænastan kemur á føroyskar hendur, verður arbeitt víðari við yvirtøkuni av samlaða loftferðsluøkinum.

**Rúsdrekkalógin broytt**

Broytingar eru framdar í rúsdrekkalógini soleiðis, at føroysk bryggjarí kunnu selja alla sína framleiðslu beinleiðis til flogfør og skip í altjóða sigling og til tollfríar sølubúðir. Hetta hevur tikið burtur eina óneyðuga forðing hjá vinnuni, samstundis sum meginreglan um, at Rúsdrekkasøla Landsins hevur einkarætt at selja brúkaranum rúsdrekka, er varðveitt.

**Ognarlutur í Formula og Vikmar seldur**

Føroya Tele seldi í fjør 56,3% av ognarlutinum í Formula. Við søluni minkaði ognarluturin hjá Føroya Tele úr 77,9% niður í 34%. Somuleiðis seldi Føroya Tele sín ognarlut í Vikmar. Sølurnar eru liður í tilgongdini hjá Føroya Tele í størri mun at miðsavna seg um kjarnuvirksemi felagsins.

**NET ger stórar íløgur**

Sum liður í at fáa greiðan skilnað millum virksemið í feløgunum hjá Føroya Tele og sum fyrireiking til eina møguliga sundirskiljing av feløgunum hevur FT-Net broytt navn og samleika til NET. Føroyar hava eitt tað fremsta farnetið í heiminum, og NET fremur í hesum árum stórar íløgur í jarðbundna fjarskiftisnetið, m.a. við at breiða út fipur kring alt landið, so Føroyar framhaldandi hava eitt tað besta og skjótasta internetið í heiminum.

**Eigarapolitikkur viðgjørdur**

Frágreiðing um eigarapolitikk landsins varð í vár løgd fyri tingið til aðalorðaskiftis. Eigarapolitikkurin er leiðreglur og snýr seg í høvuðsheitum um at fáa greiðari karmar um, hvussu landið eigur at umsita landsins vinnufeløg.

**Nýggj djóravælferðarlóg**

Nýggj lóg um djóravælferð er komin í staðin fyri djóraverndarlógina frá 1985, tí viðurskiftini eru munandi broytt seinastu sløku 35 árini. Nýggja lógin virkar fyri tíðarhóskandi djóravælferð, djóravernd og virðing fyri djórum, eins og lógin ásetur tær skyldur, sum eru galdandi í viðurskiftunum millum fólk og djór, bæði villini djór og djór, sum eru í varðveitslu hjá fólki.

**Skapandi vinnur skaptar**

Flestu átøkini í politikkinum fyri skapandi vinnur frá 2016 eru framd í verki. Filmshúsið er nú ein týðandi miðdepil fyri menningina í føroyskari filmsframleiðslu, og afturberingarskipanin til filmsframleiðslur er eitt hent amboð í arbeiðinum at fáa fleiri altjóða filmsverkætlanir til Føroyar. Úrslitini eru týðilig, tí hesi seinastu árini hevur føroyska filmsvinnan vunnið viðurkenning úti í heimi, og útlendski áhugin at taka upp film í Føroyum er eisini øktur munandi.

**Hópfíggingarskipan komin**
Íverksetarahúsið, Vinnuframi og Visit Faroe Islands fara í næstum at almannakunngera nýggja hópfíggingarskipan. Hetta er ein nýggjur fíggingarmøguleiki, sum fer at gera tað munandi lættari hjá kreativum íverksetarum at lýsa sínar verkætlanir og hjá øllum áhugaðum føroyingum at stuðla teimum fíggjarliga.

## ALMANNAMÁL

**Pensjónsnýskipanin**
Tað hevur eydnast okkum at samtykkja pensjónsnýskipanina. Eitt arbeiði, sum skiftandi samgongur í áratíggjur hava arbeitt við at fremja. Fólk liva longur, og um nøkur fá ár eru tvífalt so nógvir pensjónistar sum í dag, samstundis sum færri eru í arbeiðsførum aldri. Hetta er ein samfelagsavbjóðing, sum neyðugt er at taka í størsta álvara fyri at tryggja vælferðarsamfelagið. Pensjónsnýskipanin hevur til endamáls at tryggja øllum eitt virðiligt lív – alt lívið.

Pensjónsnýskipanin byggir á eina semju millum samgonguflokkarnar og Sjálvstýri, og í tilgongdini hava allir flokkar flutt seg til tess at gera eina framtíðar pensjónsskipan.

Pensjónsnýskipanin tryggjar, at pensjónistar við lágari og miðal inntøku fáa hægri pensjón, samstundis sum tað verður meira lønandi at arbeiða eftir pensjónsaldur.

**Vælferðarlógin**
Samgongan hevur sett sær sum mál, at vælferðarskipanin verður lagað til føroysk viðurskifti, so borgarin kann fáa bestu tænastuna. Forsorgarlógin, sum er ein hornasteinur í føroyskari vælferð og føroyskum sosialpolitikki, er upprunaliga ein donsk lóg frá 1960'unum, og hóast hon er dagførd í fleiri umførum, er hon ikki í nóg stóran mun eitt hóskandi amboð í einum framkomnum føroyskum samfelag.

Landsstýrið hevur tí lagt nógva orku í at fyrireika nýggju lóggávuna, sum varð borin í Løgtingið innan evstu freist. Landsstýriskvinnan harmast um, at uppskotini ikki komu úr nevnd, men ivast ikki í, at tey verða samtykt, so skjótt tingið aftur er virkið.

Við nýggja uppskotinum, sum má sigast at vera eitt nýbrot í føroyskum sosialpolitikki, verður almannalóggávan lagað til føroysk viðurskifti.
Uppskotið fevnir um nógvar ymiskar skipanir, sum so ella so røkka inn í flestu heim í Føroyum. Umframt at veita stuðul, tænastur og fíggjarliga trygd skipar vælferðarlógin eisini grundleggjandi viðurskifti millum tað almenna og borgaran. Borgarin skal takast við upp á ráð, tá ið avgerðir verða tiknar, sum hava ávirkan á gerandisdagin. Í dagsins samfelag við øllum tess sergreinaðu vælferðar. tænastum hevur tørvurin ongantíð verið størri á samskipan. Tí áleggur lógin í fleiri førum landsstýrismanninum at tryggja vælvirkandi samstarv um tænastur, ið verða veittar borgaranum í ymsu geirunum, so sum skúla-, heilsu- og almannageiranum. Hetta fyri at tryggja, at samanhangur er í tænastuni.

**Tvingsilslógin**
Sum partur av vælferðarlógarpakkanum er uppskot til tvingsilslóg orðað. Tvingsilslógin skal slóða fyri, at borgarin altíð kann fáa eina tænastu, ið bæði er røtt og viðkomandi fyri hann. Javnan er borgari komin soleiðis fyri í lívinum, at hann av heilsuávum ikki longur megnar at røkja egin áhugamál og útinna sín sjálvsavgerðarrætt. Í hesum høpi er eitt nú heimild fyri at seta ávaringar- og peilingarskipan í verk kring borgaran, soleiðis at hann kann ferðast tryggur í sínum nærumhvørvi, hóast hann hevur ein týðandi skerdan førleika. Til tess at rættartrygdin støðugt er í hásæti, tá ið avgerðir um tvingsil skulu takast, skipar lóggávan soleiðis fyri, at ein óheft nevnd skal gera av, um tiltøkini eru neyðug.

**Leigulógin dagførd**
Sum liður í bústaðapakka landsstýrisins er leigulógin dagførd í ár. Nakrar broytingar geva útleigarum betri rættindi, og aðrar eru fyrst og fremst leigara til fyrimuns. Markið millum vinnuliga og ikki-vinnuliga útleigu er flutt. Hetta merkir, at útleigari frameftir kann leiga eitt nú summarhús síni út, uttan at hetta kemur undir vinnuliga útleigu. Mett verður, at hetta kann eggja fleiri til at leiga út, so at útboðið av leigubústøðum verður økt.

Við broytingini hevur leigunevndin fingið heimild at seta niður ta leigu, sum leigari og útleigari sínámillum hava avtalað. Talan er um týðandi broyting, ið tryggjar leigarum munandi betri rættindi. Almannaverkið hevur við lógarbroytingini eisini fingið heimild at seta á stovn ein bráðtørvslista til hýsing av persónum, ið hava ein serliga átrokandi bústaðartørv.

**Heimild kommununnar at seta á stovn eldrabústaðir víðkað**
Sum liður í bústaðapakkanum er heimildin at seta á stovn eldrabústaðir víðkað. Áður høvdu kommunurnar sambært § 13 í løgtingslóg um heimatænastu og eldrarøkt v.m. heimild at seta á stovn eldrabústaðir til fólkapensjónistar. § 13 er broytt, so at kommunurnar nú kunnu lata byggja eldrabústaðir til borgarar, ið eru 60 ár og eldri.
Endamálið er at slóða fyri einum nýggjum bústaðamynstri, har eldru borgararnir hava møguleika at flyta inn í smærri, meira hóskandi bústaðir, so at yngru ættarliðini fáa møguleika at yvirtaka sethúsini.

**Tíðarhóskandi bústaðakarmar í Suðurstreymoy**
Landsstýrið hevur sett 200 mió. kr. av til at byggja nýggjar og virðiligar bústaðir í Suðurstreymoy til fólk við serligum tørvi.
Arbeiðið at fyrireika eitt bú- og umlættingarheim á Argjum til børn og ung við autismu gongur væl. Farið verður eftir ætlan undir at byggja seint í hesum árinum, og væntandi verður klárt at flyta inn í 2021.
Samstundis verða tvey nýggj heim til fólk við menningartarni fyrireikað, annað á Argjum og hitt í Hoyvík.
Heimið til fólk við menningartarni og fjølbreki á Argjum er til tey, ið krevja støðuga hjáveru av starvsfólki og røkt. Eftir ætlan verður spakin settur í í apríl, og klárt verður at flyta inn í september 2022.

Heimið til fólk við menningartarni á Mýruni í Hoyvík verður bygt í staðin fyri tey bæði sethúsini, sum hava verið sambýli í nógv ár. Bygdar verða 18 íbúðir í trimum eindum umframt felagsøki. Landsstýriskvinnan fegnast um, at gongd er sett á arbeiðið, og at politiska skipanin hevur tikið hetta mál í størsta álvara og sett neyðugan pening av til endamálið. Arbeitt verður nú við skipanar-uppskotinum, og gongst sum ætlað, verður farið undir at byggja fyrra hálvár 2020.

*Barnaheim*
Arbeiðið at byggja nýtt barnaheim í Havn verður í løtuni endurskoðað, og væntandi fyriliggur ein ætlan seinni í ár.

*Torfinsgøta*
Í juni fluttu sjey búfólk inn í nýggja varda bústaðin í Torfinsgøtu, sum er keyptur og umvældur til endamálið.

*Um- og útbygging*
Seinastu árini er ein miðvís um- og útbygging av fleiri stovnum gjørd, millum annað í Garðsgøtu og á Bóndaheygi. Í ár verða nakrar ábøtur og dagføringar gjørdar á bygningarnar á Eirargarði, soleiðis at umstøðurnar hjá búfólkunum verða betri, og somuleiðis á Næmingaheiminum á Hóvabrekku og sambýlinum í Sandavági. Hetta arbeiðið hevur givið rúmd fyri á leið 25 nýggjum búplássum.

*Dugni, skúlin við Áir*
Triðja byggistig á skúlanum við Áir er liðugt. Bøtt er munandi um búeindina, undirvísingarhølini og atkomuviðurskiftini. Karmarnir fyri lærarar og næmingar eru nú á einum støði, ið er neyðugt til ein vælvirkandi skúla.

*Samskipari í javnstøðumálum*
Samgongan hevur raðfest javnstøðumál frammarlaga. Ein javnstøðupolitikkur er fyri fyrstu ferð orðaður og hevur verið til aðalorðaskiftis í Løgtinginum. Ein virkisætlan við 27 átøkum verður sett í verk komandi árini. Eitt átak er at seta á stovn eina Javnstøðuskrivstovu. Fyrsta stigið er tikið. Ein samskipari er settur, sum skal virka fyri Javnstøðunevndina og Demokratia.

**Útnorðurráðstevna um javnstøðu**
Í sambandi við íslendska formansskapin í norðurlendska ráðharraráðnum varð skipað fyri væleydnaðari útnorðurráðstevnu í Havn í juni. Endamálið var at fáa menn og dreingir at virka fyri javnrættindum millum kynini, serliga á arbeiðsmarknaðinum.

**Megna títt lív**
Landsstýrið er farið undir átakið ”Megna títt lív”, sum hevur til endamáls at lofta ungum, sum hava umfatandi og samansettar sálarligar, sosialar og rústrupulleikar.
Toymisleiðari er settur til at standa á odda fyri einum tvørfakligum og matrikulleysum toymi, sum burturav skal arbeiða við at fáa og varðveita samband við tey ungu og virka sum bindilið millum tann unga og teir stovnar/myndugleikar, sum veita viðgerð og tænastur.

**Familjuískoyti til teirra við lægstu inntøkunum hækkar**
Í vár legði landsstýriskvinnan í almannamálum uppskot fyri Løgtingið, sum hevur við sær, at familjuískoytið til familjur við lægstu inntøkunum hækkar munandi. Lógarbroytingin er samtykt, og hækkaða veitingin kom í gildi í mai. Lógarbroytingin gevur eisini heimild fyri, at kvinnur, sum eru í Kvinnuhúsinum saman við børnum sínum, kunnu fáa familjuískoyti.
Tað kann hava serliga neiliga ávirkan á børnini, tá ið familjan er fátæk. Endamálið við broytingini er sostatt at fyribyrgja barnafátækradømi.

**Harðskapur og kynsligur ágangur**
Arbeiðið at basa harðskapi og kynsligum ágangi heldur fram og gongur væl. Tilboðið um sálarfrøðiliga hjálp til teirra, sum hava seinárin orsakað av kynsligum ágangi í barnaárunum, er nógv brúkt. Eisini tilboðið um sálarfrøðiliga hjálp til teirra, sum fremja ella hava framt harðskap, er væl móttikið.
Aftur í summar er nýtt tiltak í sokallaða Sex krevur samtykki-samstarvinum, sum er millum Amnesty International, Fólkaheilsuráðið, Føroya Politi og Almannamálaráðið.

**Samskipandi eind**
Samskipandi eindin skal tryggja, at ST-sáttmálin um rættindi hjá einstaklingum, sum bera brek – Breksáttmálin – virkar í verki á øllum økjum.
Hvørt landsstýrisfólk hevur valt lim í samskipandi eindina, so at hetta arbeiðið verður samskipað millum ráðini, til tess at allir okkara borgarar fáa eins góðar sømdir og møguleikar at taka lut í dagsins samfelag.
Samskipandi eindin hevur sett sjøtul á at orða eina brekpolitiska virkisætlan fyri Føroyar, ið fevnir um øll rættindi og týðandi øki, sum sáttmálin fevnir um.

**Familjurættur**
Farið er undir arbeiðið at broyta skipanina viðvíkjandi váttan og viðurkenning av faðirskapi, so at tað ikki longur verður neyðugt at møta persónliga á Familjufyrisitingini fyri at vátta faðirskapin at einum barni. Eisini verður kannað, hvussu ein ráðgeving í sambandi við hjúnaskilnað kann skipast.
Arbeiðið at gera eina føroyska foreldramyndugleikalóg verður fyrireikað. Lóggávan á økinum eigur at verða broytt, so at tað í størri mun verður tikið atlit at, hvat er best fyri barnið. Lóggáva skal gerast, sum er tillagað serlig føroysk viðurskifti.

## HEILSU- OG INNLENDISMÁL

**Sjúkrahúsverk Føroya**
Føroyska sjúkrahúsverkið er raðfest frammarlaga fíggjarliga tey seinastu árini, men kortini eru stórar avbjóðingar fyri framman. Eins og í okkara grannalondum ella í øllum heiminum veksur tørvurin á sjúkrahústænastum og viðgerðum skjótt.

Arbeitt verður áhaldandi fyri at gagnnýta alt tilfeingið í sjúkrahúsverkinum so væl, sum til ber, og fremja tillagingar. Roknað verður kortini við, at útreiðslurnar til heilsumál fara at hækka við einum munandi vøkstri tey komandi árini. Hetta merkir, at heilsumál fara at hava uppaftur størri ávirkan á fíggjarmál frameftir, og tí má samstarvið millum hesi økini styrkjast enn meiri frameftir.

Viðgerðamøguleikarnir fyri sjúklingar gerast alsamt betri, og menningin av heilivági gongur eisini við rúkandi ferð. Fólkasamansetingin broytist, og stórar avbjóðingar eru í sjúkrahúsverkinum við kostnaðarmiklum heilivági og fleiri eldri borgarum, harav fleiri við varandi ella kroniskum sjúkum, eins og tað eru fleiri borgarar, ið hava langar, álvarsligar og kompliseraðar sjúklingagongdir.

Samanumtikið kann sigast, at vit liva – og verða viðgjørd – longur, og tað er at gleðast um. Hetta merkir eisini, at útreiðslurnar økjast serliga nógv í sjúkrahúsverkinum. Tað er eyðsæð, at í stóran mun eru fleiri varandi sjúk og eldri borgarar, ið hava gagn av sjúkrahústænastunum. Nýggjur, stundum sera kostnaðarmikil, heilivágur setir fíggjarligt trýst á heilsuverkið, eins og støðuga økjandi talið á sjúklingum ger tað.

Liviumstøðurnar í samfelagnum verða onkuntíð uppgjørdar í, hvussu leingi fólk liva, og har liggja vit í Føroyum frammarlaga, næstan ovast. Vit hava tað gott í Føroyum, og nógvir sjúklingar kunnu við góðari viðgerð hava eitt gott og langt lív. Hesum kunnu vit fyri ein stóran part takka okkara dugnaligu starvsfólkum í sjúkrahúsverkinum fyri.

**Menningarætlanin fyri sjúkrahúsverkið**

Arbeiðið at seta í verk menningarætlanina fyri Sjúkrahúsverkið gongur væl. Í fjør varð Sjúkrahúsverkið skipað sum ein organisatión við einum forstjóra, sum saman við lokalu leiðslunum myndar leiðsluna í sjúkrahúsverkinum. Hetta var ein fortreyt fyri nógvum av tilmælunum í menningarætlanini. Longu nú hava vit vunnið fleiri ágóðar av umskipanini, og fleiri av tilmælunum eru longu antin sett í verk ella eru væl ávegis.

Størsta frambrotið er helst økta serlæknamanningin. Í samsvari við menningarætlanina hevur serlig serlæknapulja síðani 2017 verið sett av til nýggjar serlæknar og onnur heilsustarvsfólk, og sjúkrahúsleiðslan hevur lagt nógva orku í at fáa sett fleiri serlæknar. Raðfestingin hevur gjørt mun.

Í dag eru fleiri serlæknar enn í 2016, og sergreinir, ið hava verið ómannaðar í mong ár, eru nú mannaðar við serlæknum í føstum starvi. Í samsvari við menningarætlanina hevur tað harumframt eydnast at broyta turnusskipanina, sonevndu KBU-skipanina, so at føroysk læknalesandi í dag hava framíhjárætt at taka KBU-skeiðið í Føroyum.

Eitt gott dømi um góða samskipan er á røntgenøkinum. Arbeitt hevur verið við at skapa rúm fyri fleiri MR- og CT-skanningum á Landssjúkrahúsinum. Broytingarnar síggjast eisini aftur í virkseminum, har m.a. vanligu røntgenkanningarnar í Suðuroy og Klaksvík í 2018 eru øktar, og økingin av MR-skanningum í 2018 er so mikið sum 41 prosent samanborið við 2017.

Nevnast skal eisini samstarvið viðvíkjandi CT-skannaranum á Suðuroyar sjúkrahúsi, sum varð tikin í nýtslu í summar, har myndir verða tiknar á Suðuroyar sjúkrahúsi í samstarvi við røntgendeildina á Landssjúkrahúsinum. Hetta síggi eg sum eitt stórt framstig fyri borgararnar í Suðuroy.

Bøtta samskipanin millum sjúkrahúsini hevur eisini havt við sær, at pláss hevur verið fyri at skapa nýggj tilboð og í samsvari við menningarætlanina styrkja endurvenjingina og rehabiliteringina á ávikavist Klaksvíkar sjúkrahúsi og Suðuroyar sjúkrahúsi. Í Klaksvík er sett á stovn ein deild til endurvenjing, sonevnd neurorehabilitering. Á Suðuroyar sjúkrahúsi verður eisini arbeitt við at seta í verk landsfevnandi rehabilitering fyri sjúklingar, sum hava Parkinsonsjúku. Talan er um eitt samstarv millum Landssjúkrahúsið og Suðuroyar sjúkrahús. Tilboðið verður tvær ferðir um árið, tvær vikur hvørja ferð, og byrjað verður eftir ætlan í september.

Á Suðuroyar sjúkrahúsi er eisini ein pínuklinikk skipað, sum tekur sær av fólki, ið hevur áhaldandi pínu. Talan er um eitt tilboð, sum í nógv ár hevur manglað í Føroyum. Í løtuni eru 150–200 fólk, sum eru í viðgerð á pínuklinikkini í Suðuroy.

Fyri at skapa størri tryggleika í norður- og eysturøkinum var eitt av tilmælunum í menningarætlanini at samskipa 1870 við Klaksvíkar sjúkrahús. Hetta er í dag veruleiki. Hetta merkir, at tey í norður- og eysturøkinum, sum hava tørv á lækna, men ikki kunnu koyra til Havnar, kunnu í staðin møta til kanningar á Klaksvíkar sjúkrahúsi sama kvøld.

Eitt annað týdningarmikið tilmæli í menningarætlanini var at fáa sett eina sálarfrøðiliga eind á stovn á Landssjúkrahúsinum, ið skal kunna veita heilsu-, kreppu- og neurosálarfrøðiliga viðgerð í øllum sjúkrahúsverkinum. Í 2019 er peningur settur av til at fara undir fyrireikingarnar av eindini og byggja serfrøðina upp. Ætlanin er at játta pening á fíggjarlógini fyri 2020, so at sálarfrøðiliga eindin kann byrja sítt virksemi.

Landsstýrið hevur raðfest frammarlaga at skipa eina felags visitasjón og felags bíðilistar. Fyri at fáa hetta sett í verk hevur verið neyðugt, at ávísar fortreytir skuldu lúkast. Fyritreytirnar eru nú loknar. Við hesum verður grundarlag fyri at skipa felags visitasjón og felags bíðilistar.

**Nýggjur meginbygningur til Landssjúkrahúsið**

Nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum er ein av størstu og týdningarmestu útbyggingunum hjá landinum. H-bygningurin, sum hann er kallaður, skal hýsa nýggjum psykiatriskum depli, nýggjari medisinskari seingjadeild og nýggjari føði- og barnsburðadeild. Allar deildir fara at hava einastovur. Eisini fer bygningurin at hýsa nýggjari rehabiliteringseind og nýggjum køki umframt goymslu og parkeringskjallara. Flutt verður inn í bygningin í 2021.

Sum sæst, so er verulig gongd komin á at byggja nýggja H-bygningin. Kostnaðarætlanin er endurskoðað í mun til upprunaligu ætlanina. Nú sæst, at talan verður um ein meirkostnað, tí nakrar útreiðslur vóru ikki við, eins og ætlanir verða viðgjørdar um at fáa millum annað enn nýggjari tøkni við í byggingina.

Menningin av sjúkrahústøkni og øðrum gongur við rúkandi ferð, og ambitiónsstigið er høgt. Vit skulu hava so vítt sum gjørligt eitt framtíðartryggjað, burðardygt og nýmótans sjúkrahús til gagns fyri allar sjúklingarnar.

**Antibiotikapolitikkur**

Á heysti 2018 handaði ein arbeiðsbólkur landsstýriskvinnuni "Virkisætlan fyri mótstøðuføri móti antibiotika í heilsuverkinum í Føroyum." Hóast samlaða antibiotikanýtslan í Føroyum er á einum rímiligum stigi samanborið við nýtsluna í okkara grannalondum, hevur føroyska heilsuverkið serligar avbjóðingar av, at lutfalsliga nógvir sjúklingar koma inn á sjúkrahúsini eftir viðgerð á sjúkrahúsum uttanlands. Soleiðis koma flestu mótstøðuføru bakteriurnar inn á føroysku sjúkrahúsini.

Í samráð við viðkomandi fakfólk hevur landsstýriskvinnan í heilsu-og innlendismálum raðfest tilmælini í virkisætlanini. Eftir ætlan verður ein farmaseutur settur í hálvt starv at skipa eftirlitið við antibiotikanýtsluni og antibiotikamótstøðuføri í heilsuverkinum. Harumframt er eisini ætlanin, at eitt antibiotikaráð skal skipast.

Hendan raðfesting gevur grundarlag fyri at skipa arbeiðið við at tálma antibiotikanýtsluna og eygleiða antibiotikamótstøðuføri í Føroyum.

**Heilsutænastur í nærumhvørvinum/kommunulæknaskipanin**

Í eina tíð hevur verið arbeitt við at menna heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgarunum. Ætlanin er, at størri partur av heilsuveitingunum til borgarar skal fara fram á heilsudeplum í heilsuøkjum kring landið. Fyrimunur er fyri borgaran, at fleiri heilsutænastur kunnu verða veittar í nærumhvørvinum hjá viðkomandi. Á heilsudeplunum fara at starvast viðkomandi heilsustarvsfólk, herundir kommunulæknar, sjúkrarøktarfrøðingar, heilsufrøðingar, kostfrøðingar o.s.fr. Hetta økið skal tískil framraðfestast samsvarandi nýggju uppgávunum. Hetta arbeiðið eigur at halda fram, tí á henda hátt kann fáast eitt heilsuverk, har tænastan til borgaran verður í miðdeplinum, samstundis sum avmarkaða starvsfólka- og fíggjarliga tilfeingið í heilsuverkinum verður gagnnýtt skilabest.

Síðan hetta landsstýrið tók við, er kommunulæknaøkið raðfest munandi fremri. Talið á kommunulæknaviðtalum hevur ongantíð verið so stórt sum nú, og kommunulæknarnir í føstum starvi hava heldur ongantíð verið so nógvir. Í næstum verður ein kommunulæknaviðtala afturat sett á stovn, og tá hava vit 34 kommunulæknaviðtalur. Í samgonguskeiðinum er játtanin til serlæknaútbúgvingina til kommunulækna økt, og KBU-skipanin (klinisk basisuddannelse) er broytt, so føroyingar nú fáa framíhjárætt til at taka part av útbúgving síni í Føroyum. Henda gongdin eigur at halda fram.

**Heilsustýrið**

Seinastu árini er tað vorðið alsamt sjónligari, at vit hava tørv á einum føroyskum heilsufakligum myndugleika, sum við hollum kunnleika til føroysk samfelagsviðurskifti kann veita eina røð av heilsufakligum uppgávum. Herundir m.a. veita landsstýrinum, myndugleikum, kommunum o.ø. granskingargrundaða heilsufakliga ráðgeving, hava um hendi fólkaheilsuarbeiðið, gera greiningar og frágreiðingar á heilsuøkinum umfram menna og skipa hagtøl á økinum.

Ætlanin er at seta á stovn eitt heilsustýri, sum fer at at verða skipað í stigum. Byrjað eigur at verða við teimum økjum, ið eru á føroyskum hondum, sum hoyra einum heilsufakligum myndugleika til. Heilsustýrið skal síðani so við og við mennast til at verða ein heilsufakligur myndugleikastovnur. Innihaldið í komandi Heilsustýrinum skal tó viðgerast gjølla saman við viðkomandi pørtum, m.a. stovnum, fakfólkum og fakfeløgum á økinum, umframt í politisku skipanini, áðrenn tað verður sett á stovn.

**Fólkaheilsa**

Arbeiðið at fremja eina góða fólkaheilsu og fyribyrgja lívstílssjúkur er sera týdningarmikið, og tí eigur tað at fáa eina støðugt fremri raðfesting. Í hesum samgonguskeiði er virkisøkið hjá Fólkaheilsuráðnum víðkað til eisini at fevna um sálarliga heilsu, og er hetta at fegnast um. Fólkaheilsuráðið er í hesum sambandi farið undir eina verkætlan, sum nevnist ABC fyri sálarliga heilsu. Henda verkætlan hevur longu fingið 22 samstarvsfelagar, sum fevna um kommunur, ítróttarfeløg, sjálvbodnar felagsskapir o.s.fr. Harumframt skipar Fólkaheilsuráðið fyri eini røð av tiltøkum um rørslu, kost, royking og rúsdrekka.

**Fyribyrging og krabbameinsøkið**

Fyrireikingarnar at gera eina nýggja krabbameinsætlan fyri Føroyar eru farnar í gongd. Ein eftirmeting av krabbameinsætlanini frá 2009 er gjørd, sum vísir, at meginparturin av tilmælunum antin er settur í verk ella er væl ávegis. Í vár varð settur ein arbeiðsbólkur at eftirmeta verandi skipan við palliativum toymi og palliativari eind. Eisini skuldi bólkurin taka støðu til, um vit eiga at seta á stovn eitt hospice í Føroyum. Tilmælið varð handað landsstýrinum í summar. Næsta stig verður at taka støðu til, hvat ein komandi krabbameinsætlan serliga skal seta sjóneykuna á.

**Atlimaskapur í WHO (World Health Organization)**

Á heilsuøkinum gongur menningin sera skjótt, og tí er umráðandi, at Føroyar eru við í altjóða samstarvi á heilsuøkinum. Leingi hevur ætlanin verið at knýta Føroyar nærri at Heimsheilsustovninum, WHO. Føroyar hava á fundi við umboð fyri WHO kunnað um, at Føroyar vilja hava atlimaskap í WHO (World Health Organization). Tað er at fegnast um, at sjøtul nú er settur á arbeiðið, tí við hesum kunnu Føroyar vera við í fremstu røð á heilsuøkinum.

**Sálarlig heilsa og fyribyrging**

Stór menning hevur verið á psykiatriska økinum seinnu árini, og tilboðini til teirra, ið stríðast við sálarsjúku, eru støðugt vorðin fleiri.

Komið er á mál við at skipa økispsykiatri um alt landið sum liður í at bjóða psykiatriska tænastu til fleiri og nærri at borgarunum. Nýtt dagtilboð til børn og ung við millum annað ótta, tunglyndi og etingarólagi er skipað á Landssjúkarhúsinum. Hetta kann vera við til at byrgja fyri, at børn og ung verða innløgd. Karmarnir á Psykiatriska deplinum eru umvældir og nútíðargjørdir. Tað snýr seg eisini um at hava sjóneykuna á tað, ið styrkir okkara sálarligu heilsu.

Fólkaheilsuráðið er farið undir stórfingna verkætlan, nevnd ABC fyri sálarliga heilsu. Tvørfakligur arbeiðsbólkur hevur gjørt heildarætlan fyri sálarliga heilsu. Málið er, at øll við sálarsjúku skulu fáa eina javnbjóðis, dygdargóða og trygga viðgerð og tænastu so tætt at gerandislívinum, sum til ber. Sjøtul er settur á arbeiðið við at fáa sett tilmælini í heildarætlanini í verk.

**Etiska ráðið**

Í fjør fingu Føroyar á fyrsta sinni eitt etiskt ráð, hvørs endamál er at fremja og styrkja kjak og vitan um etiskar spurningar, sum knýta seg at nýtsluni av bio- og ílegutøkni, sum hava ávirkan á menniskjalívið. Ráðið kann harumframt fremja og styrkja kjak um aðrar almennar og prinsipiellar etiskar spurningar, sum knýta seg at heilsufakliga virkseminum á heilsu-, almanna- og kommunaløkinum.

Við etiska ráðnum er vónandi føroyska siðvenjan um politiskt at parkera etiskar spurningar nú ein farin tíð. Tað er eingin loyna, at granskingin og nýggir viðgerðarhættir seta okkum í etiskar tvístøður. Hesar tvístøður skulu vit nú kjakast um á einum dyggum grundarlagi. Etiska ráðið skal ikki siga okkum, hvat er rætt ella skeivt, men í staðin lýsa málini úr ymiskum sjónarhornum og búgva okkum onnur til víðari kjak og støðutakan.

**Rúsdrekka- og rúsevnaøkið**

Í vár samtykti Løgtingið einmælt at seta eitt lógaruppskot í gildi, har tað verða sett krøv til virksemið á stovnum, ið veita rúsviðgerð. Hóast okkara viðgerðarstovnar longu gera eitt megnararbeiði á økinum, so er neyðugt við krøvum um førleikar, sum tryggja fakliga innihaldið, eisini í framtíðini. Frameftir verður tað soleiðis, at viðgerðarstovnar skulu søkja um góðkenning fyri at kunna virka, og verður tað Heilsutrygd, sum eftir umsókn kann góðkenna ein viðgerðarstovn.

Nýggja lógin ásetur eisini, at persónar, ið hava tørv á rúsviðgerð á samdøgursstovni, kunnu fáa tilboð um ókeypis viðgerð. Hetta er nýbrot, tí frammanundan høvdu tey, ið stríðast við rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu, ongan formligan rætt til at fáa tilboð um viðgerð fyri sína misnýtslu. Samanumtikið er málið við lógini at fáa greiðari regluverk um stovnarnar, ið veita rúsviðgerð. Talan er um nýggja lóggávu á økinum, tí frammanundan er eingin lóggáva, sum regulerar virksemið.

**Fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung**

Munadyggar broytingar eru gjørdar í lógini um fyribyrgjandi heilsutænastur til børn og ung í hesum samgonguskeiðinum. Í lógini er ásett, at børn og ung hava rætt til tilboð um heilsukanningar frá kommunulækna og heilsufrøðingi. Hóast lógin kom í gildi 1. januar 2006, hevur tann parturin, sum snýr seg um heilsukanningar hjá børnum og ungum í skúlaaldri hjá kommunulækna, ikki riggað eftir ætlan, tí nærum eingi børn og ung tóku av hesum tilboði. Tørvur var á at broyta tilboðið. Lógin varð tí broytt, so heilsufrøðingar nú kunnu gera hesar kanningar. Av tí, at hesar kanningarnar nú kunnu fara fram í skúlunum, verður roknað við, at nærum øll børn fara at taka av hesum tilboði. Harafturat er tænastan frá heilsufrøðingum víðkað til eisini at fevna um tilboð til 2–5 ára gomul børn.

**HPV-koppseting til dreingir**
Tilboðið um ókeypis HPV-koppseting verður frá 1. august 2019 víðkað til eisini at fevna um dreingir. Higartil hava bert gentur fingið hetta tilboð. Hetta er tann fyrsta – og higartil einasta – koppseting ímóti krabbameini, og tað er at fegnast um, at vit kunnu koppseta ímóti hesi herviligu sjúku. Hjá gentum er koppsetingin serliga fyri at sleppa undan lívmóðurhálskrabba seinni í lívinum, og hjá dreingjum kann hon fyribyrgja ávísum sløgum av krabbameini umframt øðrum sjúkum. Føroyar kunnu nú teljast millum heimsins fremstu lond, tá ið tað snýr seg um ókeypis koppseting ímóti HPV.

**Umhvørvi, kortmyndugleiki, kommunur og útoyggjar**

**Náttúra og umhvørvi**
Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (náttúrumargfeldislógin) varð løgd fyri tingið, men varð ikki avgreidd, áðrenn Løgtingið fór til hús.

Náttúran er tí føroyska samfelagnum virðismikil, og margfeldið í náttúruni er ein fyritreyt fyri náttúrutilfeinginum, sum á mangan hátt er grundarlag undir okkara lívstreytum og trivnað. Náttúran skapar eisini karmar fyri náttúruupplivingum og ferðavinnu.

ST-sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi varð samtyktur á heimsfundinum í Rio De Janeiro í 1992. Í 1993 samtykti Løgtingið at taka undir við sáttmálanum.

Sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi setti nýggjan karm um heildarnáttúrufyrisiting og var fyrsta stóra altjóða umhvørvisavtala, sum so greitt varpaði ljós á sambandið millum brúk og vernd. Men hóast sáttmálin er settur í gildi í Føroyum, og Løgtingið hevur tikið undir við honum, hevur hetta ikki sæst aftur í føroyskari náttúrulóggávu.

Við uppskotinum til løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni varð lagt upp til nýtt støði fyri røkt av margfeldinum í føroysku náttúruni í samsvari við sáttmálan um lívfrøðiligt margfeldi. Umframt lívfrøðiligt margfeldi hevði lógaruppskotið til endamáls at verja landslagsmargfeldi og jarðfrøðiligt margfeldi, og sum felagshugtak fyri alt margfeldi í náttúruni varð hugtakið náttúrumargfeldi brúkt. Uppskotið fall burtur, men er klárt at leggja fyri Løgtingið aftur, um semja fæst fyri hesum.

Farið er longu undir at skipa eina miðvísa innsavning av vitan, sum skal verða grundarlag fyri eini burðardyggari umsiting av náttúru okkara. Harumframt er ætlanin at fáa sett sjøtul á arbeiðið við árinsmetingum av firðunum.

Aftan á eina komandi náttúrumargfeldislóg verður neyðugt at fara undir eina tilgongd viðvíkjandi eini planlóg. Ikki fyrr enn vit hava eina yvirskipaða planlóg, er ringurin heilur. Lóg um umhvørvisvernd, lóg um verju av havumhvørvinum, komandi náttúrumargfeldislóg og at enda eina yvirskipaða planlóg.

Við støði í tilmælum um átøk fyri at basa plastdálking er ætlanin at dagføra pantskipanina og kunngerðina um burturkast, soleiðis at meira av plasti kemur til høldar og verður endurnýtt. Farið verður eisini undir miðvísa almenna upplýsing um vandan fyri dálking við plasti.

Í nú skjótt farna valskeiði eru m.a. hesar kunngerðir lýstar á náttúruverndarøkinum: Bygningskunngerð (BK-2017), kunngerð um viðgerð og tøming av barlastarvatni, kunngerð um sigling kring Ramsar-oyggjarnar Nólsoy, Skúvoy og Mykines, kunngerð um fyribyrging og týning av rottu, kunngerð um luftdálking frá skipum og kunngerð um at fyribyrgja dálking frá oljutangum.

**Yvirtøkan av kortmyndugleikanum**

Hin 1. apríl í ár varð landkortøkið yvirtikið. Hin 1. januar 2020 verður sjókortøkið yvirtikið.

Ein kortmyndugleiki hevur almennu ábyrgdina og uppgávuna at gera geodetiskar uppmátingar og topografiska kortlegging. Í hesum liggur eisini at áseta fyrisett mát ella ein felags standard fyri landafrøðiligar mátingar í Føroyum, at fyriskipa regluligar loftmyndatøkur yvir landið, at gera lendismyndil fyri landið og at gera myndakort av Føroyum.

Sjókortøkið er heilt nýtt arbeiðsøki í Føroyum. Kortmyndugleikin á sjónum hevur um hendi uppmáting og kortlegging av føroyskum sjóøki. Týðandi atlitið at trygd á sjónum ger, at myndugleikin hevur einkarrætt at gera sjókort og hevur skyldu at fyriskipa neyðuga uppmáting og sjókortlegging. Sambært altjóða SOLAS-sáttmálanum skulu øll skip hava tøk kort, sum ein almennur sjókortmyndugleiki hevur givið út.

Nautiskar fráboðanir eru uppgáva hjá kortmyndugleikanum. Tær eru neyðugt ískoyti til sjókortini og skulu eisini vera til taks umborð. Sjókortmyndugleikar skulu uttan drál gera vart við viðurskifti og broytingar, sum hava týdning fyri skip og bátar og siglingarleiðir teirra. Myndugleikin kann gerast endurgjaldsskyldugur, um kort og aðrar útgávur og fráboðanir ikki eru dagførdar og/ella ófullfíggjaðar.

Ábyrgdin fevnir um kortagerð, men eisini um at tryggja samfelagnum álítandi og dagførdar upplýsingar, eitt nú til GPS-arar og aðra staðsetingartøkni. Umhvørvisstovan umsitur og hevur myndugleikan á økinum.

Kortmyndugleikin og nýggja talgilda føroyakortið passa sum fótur í hosu í samstarvi við Talgildu Føroyar og lutin sum grundardátuveitari í stóru og týdningarmiklu verkætlanini. Í juni varð nýggja heimasíðan foroyakort.fo tikin í nýtslu. Umframt at tað ber til at fara inn og hyggja at alskyns kortum av Føroyum, eru tey nú eisini tøk at nýta talgilt hjá øllum. Ein kann taka niður kort og aðrar lendisdátur og nýta tær í egnum skipanum og forritum ókeypis og frítt. Eitt nú kunnu fyritøkur menna forrit og skipanir grundað á kortini, men frítt er hjá øllum at nýta dáturnar til privat, vinnulig og almenn endamál.

**Útoyggjastuðul**
Útoyggjastuðulin, sum í 2015 var 770.000 kr., er hetta valskeiðið hækkaður upp í 1,1 mió.kr. Stuðulin í ár varð býttur millum 25 umsóknir um stuðul.

Orkupolitikkur

**Ferð á grøna orku**
Uppskot til orkupolitikk er gjørt við orkuskifti fyri eyga. Uppskotið vísir, hvussu oljunýtslan kann verða minkað, og hvussu vit kunna framleiða egna orku á ein burðardyggan hátt. At minka oljununýtsluna er viðkomandi bæði fyri orku- og umhvørvisøkið. Uppskotið gevur eina heildarmynd av, hvussu umleggingin kann gerast.

Føroyar skulu hava nýggjan veðurlagspolitikk, og er uppskot gjørt til eina komandi samgongu at viðgera.

Parísavtalan, sum Føroyar saman við flestu heimsins londum hava tikið undir við, setir munandi krøv um at minka útlátið av veðurlagsgassi.

Fleiri átøk eru gjørd til tess at gera tað lættari at velja grønar orkuloysnir. Tó skulu enn fleiri átøk gerast fyri at fáa skiftið at ganga skjótari, m.a. fáa betri fíggingarmøguleikar til grønar hitaloysnir.

Stórar útbyggingar av orkuframleiðsluni eru ávegis. Í 2020/21 verða helst tríggjar vindmyllulundir settar í verk, sum svara til 42 mW. Við hesum fer mátturin av vindi frá teimum verandi 18 mW upp í 60 mW. Arbeitt verður harumframt við tveimum pumpuverkætlanum, har endalig avgerð tó ikki er tikin enn.

Uppskot til lóg um eltrygd varð lagt fyri Løgtingið í vár, men kom ikki aftur úr nevnd. Uppskotið miðar eftir at dagføra trygdarreglurnar fyri elinnleggingar.

## SAMFERÐSLU- OG ARBEIÐSMARKNAÐARMÁL

**Samferðsluætlan**
Eitt væl útbygt og gott samferðslukervi er ein fyritreyt fyri at menna samfelagið og fyri trivnaðin hjá øllum borgarum í samfelagnum. Føroyar skulu verða ein eind, har tað er skjótt, lætt og trygt at ferðast allastaðni.

Samferðsluætlanin, sum skal galda fyri tíðarskeiðið 2018–2030, er dagførd. Samferðsluætlanin er eitt haldgott grundarlag fyri at gera semjur um at reka, viðlíkahalda og at gera skilagóðar íløgur í infrakervið, herímillum vegir, tunlar og brýr. Ætlanin fevnir eisini um at endurnýggja skipini hjá Strandfaraskipum Landsins. Við samferðsluætlanini verður fyrilit sýnt náttúruvernd og ferðavinnu.

**Undirsjóvartunlar**
Arbeiðið við eysturoyartunlinum gongur eftir ætlan, og borað er nú ígjøgnum. Tunnilin verður tikin í nýtslu komandi ár.

Farið er undir arbeiðið at gera sandoyartunnilin, og hann verður eftir ætlan liðugur í 2024.

Við vágatunlinum, norðoyatunlinum, eysturoyartunlinum og sandoyartunlinum verða 90 prosent av føroyingum knýttir saman í eitt veganet. Tað er eitt stórt framstig fyri føroyska samfelagið sum heild; vinnuliga, mentanarliga og fólksliga.

P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyatunnilin og P/F Eystur- og Sandoyartunlar hava júst stovnað eitt partafelag, P/F Tunnil, sum skal reka eina felags innkrevningarskipan fyri øll tunnilsfeløgini. Felagið hevur heimstað í Saltangará.

Við einari felags innkrevningarskipan fær kundin nógar fyrimunir. Honum nýtist ikki at hugsa um, hvar gjaldið skal rindast, ella hvat tunnilsfelag rindast skal til. Kundin kann framvegis hava eitt hald. Nógvir umsitingarligir fyrimunir eru somuleiðis við einari felags innkrevjingarskipan. Eitt nú verða útreiðslurnar av uppkrevjingini býttar millum tunnilsfeløgini.
Hvørt tunnilsfelag er framvegis ein sjálvstøðug inntøku-, kostnaðar- og íløgueind.

Nýstovnaða felagið P/F Tunnil hevur gjørt leigusáttmála um hølir í Saltangará og flytur úr Havn seinni í ár. Starvsfólkini í tunnilsfeløgunum fara at starvast í nýggja felagnum P/F Tunnil.

Ein arbeiðsbólkur hevur arbeiðtt við málinum um at fyrireika ein suðuroyartunnil. Tilmæli um, hvør loysn er best viðvíkjandi linjuføring, fígging, atliti at ferðavinnu og annað er nú latið landsstýrinum.

**Tunlar**
Fyrsta skotið er nú latið av fyri einum nýggjum hvalbiartunli.

So skjótt Hvalbiartunnilin er boraður ígjøgnum í 2020, er ætlanin at fara undir at bora tunlarnar norður um Fjall.

Tunnilslið er skipað á Landsverki, sum skal bora tunlar til smærru bygdirnar. Fyrsti tunnil, sum verður gjørdur, er dalstunnilin, og arbeiðið við verkætlanini er byrjað.

**Verklagslógir**
Verklagslóg um innkomuvegin til Havnar og verklagslóg um innkomuvegin í Runavík verða eftir ætlan klárar at leggja fyri Løgtingið í heyst.

**Viðlíkahald av landsvegum**
Landsvegakervið veksur alsamt í vavi, og fleiri krøv verða sett til trygd og dygd til vegagerð, tunlar, brýr, viðlíkahald og rakstur. Ásannast má, at viðlíkahaldstørvurin er stórur, og neyðugt verður at raðfesta viðlíkahald fremri.

**Strandferðslan**

Strandfaraskip Landsins skulu lúka landsins tørv á fólka- og farmaflutningi. Arbeitt verður støðugt við at hækka tænastustigið og bøta um umstøður stovnsins. Til dømis er ein bátur keyptur til at røkja siglingina á Hest- og Koltursleiðini.

Eitt eykaskip til Strandfaraskip landsins verður bygt, sum kann røkja allar farleiðir í Føroyum uttan Suðuroyarfarleiðina. Skipið verður liðugt komandi vár.

Við eykaskipinum verður lættari at veita eina enn betri tænastu, hvat túratali, trygd, komfort og grønari rakstri viðvíkur. Báturin fer at ganga 20 míl við ferðafólki og kann bæði sigla upp á ravmagn og gassolju. 96 ferðafólk og 3 persónbilar ella 1 stórur bilur fara at rúmast umborð á skipinum.

Føroysku ferjurnar lúka ikki dagsins krøv til ferðamannaskip. Eftir samferðsluætlanini er neyðugt at fara undir eina tilgongd at endurnýggja ferjuflotan hjá Strandfaraskipum Landsins.

Arbeitt verður vit at javnseta ferða- og flutningskostnaðin.

Lóg um fólka- og farmaflutning er broytt. Sáttmálaskeiðið til útbjóðing av Bygdaleiðum er longt úr 5 árum upp í 7 ár. Hetta var eitt stórt ynski frá vinnuni. Landsstýrið hevur við einum ískoyti til útbjóðingartilfarið valt, at Sandoyggin skal verða menningarøki fyri grønari ferðslu í Føroyum.

**Akstovan**

Gildistíðin á koyrikortinum er víðkað. Frá at skula endurnýggja koyrikortið við 70 ára aldur er hetta nú broytt til 75 ár.

**Ferðslutrygd**

Fyri einum mánaði síðan handaði ein arbeiðsbólkur landsstýrismanninum í samferðslumálum nýggja ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar. Ferðslutrygdarætlanin var frá 2007 og hevði sum stevnu at minkað ferðsluóhapp við fólkaskaða 30%. Nógv er hent á ferðslutrygdarøkinum síðani 2007.

Í 2018 var fyrstu ferð, at ongin doyði í ferðsluni í Føroyum. Hendan góða gongdin má halda fram, og tí skulu vit seta okkum nýggj mál, ið bøta um ferðslutrygdina.
Arbeiðsbólkurin hevur valt at seta fokus á átta sokallað fokusøki. Tey verða øll mett at hava sera stóran týdning fyri ferðslutrygdina.

Nøkur fokusøkið hava eisini lutmál. Fyri at røkka málunum í Ferðslutrygdarætlanini eru gjørd 70 tilmæli, sum arbeiðsbólkurin metir kunnu vera við til at røkka málunum.

Høvuðsmálið í ferðslutrygdarætlanini er, at í 2027 skulu í mesta lagi vera 21 ferðsluóhapp við fólkaskaða.

Tað finst ikki eitt greitt svar til, hvussu ferðslutrygdartrupulleikin skal loysast, men tað eru fleiri viðurskifti í felag, sum gera, at vit koma nærri null-hugsjónini. Fyri at røkka málum krevst samstarv millum fleiri stovnar og myndugleikar í samfelagnum, sum allir á hvør sín hátt varða av økjum, sum kunnu verða ferðslutrygdini til bata.

**Barsilsskipanin**

Við broyting í barsilslógini, ið varð samtykt tann 1. mai 2019, varð barsilsfarloyvið við barsilspeningi longt við tveimum vikum, úr 46 vikum upp í 48 vikur. Foreldur hava rætt til barsilsfarloyvi í 52 vikur eftir barnsburð. Mamman hevur rætt til barsilsfarloyvi við barsilspeningi 14 tær fyrstu vikurnar. Pápin hevur rætt til barsilsfarloyvi við barsilspeningi í 4 vikur, sum hann kann velja at brúka samstundis, sum mamman er í farloyvi. Síðan hava foreldrini 30 vikur við barsilspeningi, ið tey kunnu býta sínámillum, men ikki brúka samstundis, eftir 14 tær fyrstu vikurnar.

**Arbeiðs- og brunaeftirlitið**

Kunngerðarbroyting kom í gildi í juni í ár, sum gevur Arbeiðs- og brunaeftirlitinum heimild til at løggilda serkønar veitarar, sum kunnu hava eftirlit við gassskipanum í húsvognum.

**Flutningur av vandamiklum farmi á landi**

Nýggj kunngerð er í summar lýst, ið ásetur reglur fyri landvegis flutning av vandamiklum farmi, so sum spreingievnum, brennievnum, fýrverki, eldfimum løgum, eldhættisligum og eldnørandi gassum. Kunngerðin hevur heimild í fýra løgtingslógum.

## UNDIRVÍSINGAR- OG MENTAMÁL

**Dagstovnar**

Av øllum virksemi her á landi hevur einki størri týdning enn tað, vit gera fyri børnini. Tey eru týdningarmesta tilfeingið, vit hava, og tí mugu vit tryggja smæstu borgarunum bestu korini til stuðul og menning.

Á dagstovnaøkinum eru hetta seinasta árið fleiri broytingar gjørdar, millum annað er nýggja námsfrøðihjálparaútbúgvingin klár og verður boðin út í Heilsuskúlanum í januar 2020. Dagstovnaráðið, sum kommunurnar í felag varða av, er farið til verka, og námsfrøðiliga leiðsluútbúgvingin, sum hevur staðið skúlaleiðarum í boði, verður nú eisini boðin dagstovnaleiðarum fyri at styrkja leiðsluliga partin av hesum týdningarmikla øki. Myndugleikarnir báðir á økinum hava nú harafturat tikið upp eitt serligt skipað samstarv – eisini við Setrið og fakfeløg – um neyðugastu átøkini at styrkja dagstovnaøkið komandi árini.

Í sambandi við, at 2018 var "Ár fyri málmenning hjá børnum", fáa allir nýføðingar nú Barnasangbók Føroya í vøggugávu á føðideildini, so at foreldrini fáa eitt ítøkiligt amboð til at stimbra málið frá fyrstu løtu. Til tey eitt sindur størru børnini eru allir 114 sangirnir lagdir út á youtube sum ein mótvekt til rúgvismikla enska tilfarið.

**Menna fólkaskúlan**
Eisini fólkaskúlaskipanin verður stútt og støðugt eftirhugd, soleiðis at vit altíð tryggja okkara næmingum ein góðan og tíðarhóskandi skúla. Seinastu tíðina hevur breið semja verið um at gera fleiri broytingar í fólkaskúlalógini:

1) Samfelagsfrøði er nú kravd lærugrein í 7.–9. skúlaári. Námsætlan og undirvísingartilfar er samstundis gjørt til lærugreinina.
2) Lærugreinin ”tónleikur” er broytt til ”sangur og tónleikur”, og ásett er, at morgunsangur eigur at vera partur av vanliga skúladegnum, eins og heitt er á skúlarnar um at nýta ein tíma um vikuna til sang í innskúlingini.
3) 2 tímar av undirvísingartímatalinum í hvørjum flokki kann nýtast til at menna sang, handverk og list, vallærugreinaskipan og til at seta inn í flokkum við øktum læraratímum.
4) Kommunur kunnu lutvíst skipa síni skúlaviðurskifti felags, uttan at tað krevst, at tær stovna ein felagsskúla við sjálvstøðugari leiðslu og felags skúlastýri.
5) Skúlasamstarvið millum størri og smærri skúlar er bøtt, so at ein minni skúli kann verður lagdur saman við einum størri skúla, men tó verða varðveittur sum undirvísingarstað.

Hartil eru fleiri tiltøk gjørd fyri at styrkja og menna fólkaskúlan. Skúladagatalið hjá næmingum er stytt við fimm døgum, so tey fara í summarfrí áðrenn longsta dag, og lærarar skulu brúka dagarnar til ráðlegging og námsfrøðiliga menning. Námsfrøðilig ráðgeving, sum veitir skúlum ráðgeving í fakligum og námsfrøðiligum spurningum, er skipað í Námi, umframt at sjøtul er settur á arbeiðið at dagføra námsætlanirnar. Førleikastovurnar kring landið eru styrktar, kunngerð við arbeiðslýsingum lýst, lærugreinaráðgevar eru settir bæði fyri fólkaskúlan og miðnám, fleiri tímar eru settir av til skúlavegleiðing, og arbeiðið við at menna fólkaskúlaleiðslurnar heldur fram.
Sáttmálin um skúlasamstarv millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu er nú góðkendur sambært nýggjastu lógarbroytingunum.

Lands- og PISA-royndir hepnaðust í ár sera væl, og úrslitini verða nýtt til at menna skúlan framhaldandi. Eisini er stór trivnaðarkanning gjørd, sum vísir, at happingin í fólkaskúlanum støðugt minkar, og at trivnaðurin økist. Fyrstu tilmælini frá kanningini verða nú sett í verk í einum nýggjum trivnaðarpolitikki. Hjá yngstu næmingunum verða lesikanningar í byrjanarundirvísingini settar í verk, soleiðis, at vit skjótt fanga tey, ið hava eyka hjálp fyri neyðini.
Nýggj avtala er gjørd við Íverksetarahúsið um undirvísingartilboð í íverksetan – eisini til yngri flokkar – og um árligu kappingina.
Í Suðuroy er eftirskúlatilboðið góðkent, og Føroya Eftirskúli kann fara til verka.

**Sernámsøkið**
Tá tað kemur til sernámsøkið, er nú lættari hjá skúlunum at leggja virksemið til rættis sjálvir.
Ein nógv størri partur av sernámsfrøðiligu tímunum verður nú tillutaður sum miðfirraðir tímar.

Hartil er nógv gjørt fyri at styrkja sernámsfrøðiligu tilboðini kring landið: Størri dentur er lagdur á ráðgevandi virksemið hjá Sernámi, serflokkar eru skipaðir í fólkaskúlum kring alt landið, serbreytir eru skipaðar á flestu miðnámsskúlum, og serligt skipað miðnám heldur fram fyri næmingar við serligum tørvi, sum kunnu taka eina vanliga gymnasiala útbúgving. Tilboðið Rásin virkar væl og er vælumtókt, og peningur er settur av til at fyrireika útbygging.

**Miðnám**

Hvat ið miðnámi viðvíkur, vóru øll samd um, at Havnini tørvaði betri karmar, tí allir miðnámsskúlarnir vóru slitnir og ov trongir. Glasir hevur uttan iva fingið flestar yvirskriftir seinasta árið – ikki allar positivar – hóast skúlin stórt sæð fungerar, og fólk hava funnið seg til rættis í bygninginum. Men eisini á Kambsdali er vorðið trongligt, og tí halda vit á at fyrireika útbyggingina har.

Men innihaldsliga er eisini ymiskt hent á miðnámsøkinum. Breytaskipanin er eftirmett, og tillagingar verða nú gjørdar og settar í verk: M.a. verður breytaverkætlanin styrkt, og betri møguleikar verða fyri at velja fremmandamál. Lestrarvegleiðingin verður eisini styrkt og samskipað við aðrar stovnar.

Námsfrøðiliga útbúgvingin, sonevnda pedagogikum, fyri lærarar á miðnáms-, yrkis- og vinnuskúlum er skipað av nýggjum og løgd til Setrið at umsita. Hon byrjar eftir nýggja leistinum í heyst. Farið er eisini undir at endurskoða námsætlanir á miðnámi. Nám skipar arbeiðið, og tilgongdin at seta lærugreinaráðgevar er eisini byrjað á hesum útbúgvingarstiginum.

Tað hevur somuleiðis havt týdning fyri hesa samgonguna, at okkara ungu skulu velja útbúgving eftir hegni og hugi – og ikki bara fylgja streyminum til eina bókliga útbúgving. Tí er eisini yrkisútbúgvingarskipanin raðfest og eftirmett, og tillagingar verða nú gjørdar og settar í verk.

**Trípartasamstarv**

Samstarvið við vinnuna hevur verið gott og tætt, og trípartasamstarvið millum arbeiðsgevarar, arbeiðstakarar og landið miðjar ímóti eini konjunkturútjavnandi skipan, sum skal tryggja, at lærlingatalið gerst støðugari. Broytingar verða í longd á skúlaskeiðum, takast kann upp tvær ferðir árliga, arbeitt verður fram ímóti einari reinari lærlingaskipan við støðishálvári, kunning og vegleiðing um yrkisútbúgvingar verður ment. Samráðingarnar hava verið, og semja er gjørd, og nú verður farið undir at taka seinastu fyrireikandi stigini. Hartil er FM fyri handverkslærlingar sett í verk, og í løtuni verður kannað, um føroysku vinnararnir kunnu sleppa víðari til at luttaka í stóru EM-kappingini í handverki.
Nýggj tól og amboð eru loksins eisini útvegað skúlunum til yrkisútbúgvingarnar.
Fyrireikandi fundir hava verið um fiskivinnu, alivinnu og sjógæti og útbúgvingartilboð innan hesi yrki, og farið verður nú ítøkiliga at fyrireika skeið og útbúgvingarstig.

Stuttu skúlaskeiðini fáa somuleiðis betri karmar. Húsarhaldsskúlin í Klaksvík kann nú byggjast, tí lógin um stuðul er samtykt, og tilsøgn send skúlanum. Í Vági hevur ítróttarháskúlin verið ein sonn sólskinssøga við næmingum úr Føroyum og útlondum, og Bústaðir byggja nú næmingabústaðir.
Og á Sandi hevur háskúlin hjá Veltuni fingið grønt ljós, og klárt er at fara til verka.

Eisini tilboðini við stuttum framhaldsútbúgvingum eru nú víðkað. Í ár vórðu framhaldsútbúgving í byggifrøði og í íverksetan á Glasi lagdar afturat.

**Maritimar útbúgvingar**

Framvegis eru vit ein siglandi tjóð, og nógv er sett á skránna fyri maritimu útbúgvingarnar. Fyrstu aspirantarnir á navigatiónsøkinum hava nú fingið prógv, og farið er undir aspirantútbúgving á maskinmeistaraøkinum eisini. Aspirantskipanin er væleydnað og virkar sera væl saman við klassisku útbúgvingunum. Eftir ynski frá vinnuni verður dekkaraútbúgvingin hartil tillagað, so øll skúlagongdin verður tikin, áðrenn verkligi parturin byrjar. Eisini verður arbeitt við at útvega siglandi fólkinum møguleika fyri víðari útbúgving. Í heyst fáa maskinmeistarar tilboð frá Setrinum um við fyrimuni at taka bachelorútbúgving í maskinfrøði, sum tryggjar víðari lesnað – til dømis til verkfrøðing.

**Fróðskaparsetrið**

Setrið hevur verið í hølisneyð, men tað bøtti munandi um høliskarmarnar, tá ið Sjóvinnuhúsið varð tikið í nýtslu. Málið er eitt felags kampus, og ein arbeiðsbólkur hevur gjørt uppskot til heildarloysn fyri hølisviðurskiftini hjá Setrinum. Semja er gjørd við Tórshavnar Kommunu um framhaldandi fyrireiking av útbyggingini. Bólkur er nú útnevndur at greina kampusuppskotið fram ímóti prosjektering.

Eisini í virksemi Setursins eru nýbrot. Nýggja diplomútbúgvingin í list byrjar í heyst, og sama ger nýggja og nógv umbidna BA-útbúgvingin í løgfrøði.

**Útbúgvingarstuðul**

Eitt nýbrot er, at øll lesandi á hægri lestri nú fáa útbúgvingarstuðul í 12 mánaðir, og stuðulin er hækkaður við 500 kr. um mánaðin. Lesandi, sum eiga børn, fáa nú 1000 kr. um mánaðin í stuðli fyri hvørt barnið.

**Lestrarvegleiðing raðfest**

Men ikki bara fíggjarligur stuðul er raðfestur. Arbeitt verður eisini við at skipa heildarumfatandi lestrarvegleiðingarskipan, ið kann vegleiða ung og vaksin í yrkis- og útbúgvingarspurningum. Nýggj heildarætlan fyri gransking í Føroyum er fyrireikað, og lógaruppskotið kemur sannlíkt fyri Løgtingið í heyst. Granskingarstarv fyri sokallaðu Beta-skjølini er lýst at byrja 1. september.

**Førleikameting**

Men ikki øll hava prógv, sum vísa teirra førleikar. Nógv hava áravís av royndum – men tey hava ilt við at prógva hesar góðu førleikarnar. Hetta varð tó broytt við skipanini fyri førleikameting. Skipanin er farin at virka, og fleiri eru førleikamett. Hartil skal arbeiðsmarknaðardepil skipast, og nýggj skipan fyri vaksnamannaútbúgvingar – tey eru lýst í áliti. Í tinginum hevur aðalorðaskifti verið um hetta mál, og arbeitt verður víðari saman við pørtum á arbeiðsmarknaðinum um, hvussu vit fremja vaksnamannaútbúgving í Føroyum. Tilmælið um karrieruvegleiðing verður sett í verk sum tað fyrsta, nú Vegleiðingarstovan er latin upp.

**Mentan**
Fortreytin fyri at vita, hvagar vit skulu fara, er at vita, hvaðani vit koma. Soleiðis ljóðar eitt sannleiksorð, tí søgan er jú ómetaliga týdningarmikil fyri eina og hvørja tjóð. Tí má týdningurin av Tjóðsavninum ikki undirmetast, og peningur er settur av á íløguætlanini at byggja nýtt Tjóðsavn. Til nýggja savnið er klárt, skal Tjóðsavnið yvirtaka gráa bygningin í Hoydølum, sum eisini fer at rúma listafólkum og teirra skapandi og listarliga virksemi.

Fyrr í ár heitti Mentamálaráðið eisini á føroyingar um at koma við uppskotum um, hvørji mentanarlig fyribrigdi eiga at vera fevnd av UNESCO-sáttmálanum fyri verju av siðaarvi. Sáttmálin er settur í gildi í Føroyum, og arbeiðið við at skipa listan við varðveitingarverdari og livandi mentan er farið í gongd.

Eisini søguligu skjølini hava ómetaligan týdning, og tí er Landsskjalasavnið – við heimild í nýggju lógini á økinum – farið undir at skipa talgildu varðveitingina av savnindum í Føroyum, eins og eitt skjalasavn er skipað á Tvøroyri, sum skal skráseta og skipa mongu søguligu skjølini á staðnum.

Tá ið talan er um nútíðarlist, verður fyrireikað at byggja nýtt tjóðleikhús til Tjóðpallin. Eftir ætlan skal landskassin rinda størsta partin, og restin av byggikostnaðinum skal fíggjast av grunnum, vinnu og kommunum. Nýggja skipanin við yrkislistafólkalønum, sum Mentanargrunnur Landsins umsitur, er farin at virka, soleiðis at trý yrkislistafólk árliga fáa játtað trý ára listafólkaløn. Skipanin skal tryggja yrkislistafólkum arbeiðsnáðir í eitt longri samanhangandi tíðarskeið. Yrkislistafólkalønin kann leingjast tríggjar ferðir upp í níggju ár tilsamans.
Men eitt er løn til at skapa – eitt annað er løn fyri upphavsrættin av tí, sum er skapt. Fjølrit virkar nú sum upphavsrættindafelagsskapur og umsitur upphavsrættin hjá listafólki í Føroyum. Sum heild eru viðurskiftini viðvíkjandi upphavsrætti um at koma í eina trygga legu, so at listafólk fáa ta samsýning, tey eiga.

**Kringvarp, ítrótt og kirkja**
Ein av sterkastu mentanarberum okkara er Kringvarpið, og tó at øll munnu vera góð við tað, hevur kortini nakað av kjaki verið um, hvussu tað skal fíggjast. Kringvarpslógin er nú broytt soleiðis, at kringvarpsgjaldið verður kravt inn fyri hvønn íbúgva yvir 23 ár. Nýggja skipanin virkar sum heild væl.

Í ítrótti verður av øllum alvi strongt á at vinna Føroyum limaskap í Altjóða Olympisku Nevndini (IOC). ÍSF leiðir hetta stóra og sera týdningarmikla arbeiðið. Limaskapur í nevndini hevði latið føroyskum ítróttarfólki nógvar dyr upp. Vit eru øll errin av okkara mongu, evnaríku íðkarum, og stuðulin til ítróttin er øktur, tí tað kostar meiri, tá vit klára okkum væl. Eyka stuðul er eisini veittur í sambandi við luttøku í altjóða kappingum, t.d. hondbólt. Hartil er stuðulin til føroyska telving hækkaður, og nýggi føroyski stórmeistarin er nú settur í starv sum lærugreinaráðgevi í talvi á Námi, har hann leggur lærarum og næmingum lag á í talvundirvísingini í fólkaskúlanum.

Í Fólkakirkjuni – og í kjakinum sum heild – fylti tilgongdin til broytingarnar í hjúnabandslóggávuni nógv. Men breið undirtøka er nú fyri eini støðu í fólkakirkjuni, har virðisgrundarlagið hjá fólkakirkjuni er hildið í hevd, samstundis sum lóggáva landsins er vird.

Í fjør varð á fyrsta sinni loyvi givið til at prestvíga prest við tí fyri eyga, at hann fyrst og fremst kundi virka hjá fríum, kirkjuligum felagsskapi. Hetta var eitt nýbrot fyri føroyskan kirkjusið, sum elvdi til kjak, áðrenn semja fekst. Annars er uppbýtið millum prestagjøldini í Norðstreymoy og Vágum broytt, og eitt sóknarprestaembæti er skipað afturat. Í Suðurstreymoyar norðara prestagjaldi (Hoyvík, Hvítanes og Kaldbak) er eitt sóknarprestaembæti skipað afturat, tí stórur vøkstur er bæði í fólkatalinum og kirkjuliga lívinum.

**Málpolitikkur**

Í ár eru liðin 200 ár, síðani V. U. Hammershaimb varð borin í heim, og hetta hevur verið hátíðarhildið við hópin av tiltøkum kring landið, ið hava sett føroyska málið á breddan. Tískil var tað eisini natúrligt, at orðabókasáttmálin við Sprotan varð endurnýggjaður, so Sprotin framhaldandi verður ókeypis hjá øllum at nýta á netinum. Viðvíkjandi nógv umrøddu máltøknini verður nýggjur rættstavari stuðlaður – og føroyskt mál skal fáast inn í samskiftistøknina. Máltøknimót er skipað hesum viðvíkjandi, og verkætlan verður fyrireikað. Fundur hevur verið millum landsstýriskvinnuna og íslendsku ráðfrúnna um samstarv landanna millum um máltøkni.

Seinastu árini hevur ein onnur málslig avbjóðing stungið seg upp, nú nógvir tilflytarar eru komnir til Føroya. Føroyskt skal skipast sum annað mál, og bæði børn og vaksin skulu hava betri málslig tilboð, tá ið tey koma til Føroya. Ein málskúli, ið tekur støði í altjóða skipanini CEFR, er skipaður og byrjar at virka í heyst. Í hesum sambandi byrjar verkætlanin at skipa undirvísingartilfar, útbúgving fyri undirvísarar, politikkmenning, próvtøkutilfar -og hættir, greina samstørv v.m.

Hartil má øll fremmandamálsundirvísingin endurskoðast, og ein ætlan er handað landsstýriskvinnuni um hetta økið, og fyrstu átøkini verða fyrireikað. Reglurnar um stuðul frá Studna til málskeið eru víðkaðar.

Stór lesikanning er gjørd, sum vísir, at føroysk børn lesa ov lítið – nógv minni enn javnaldrar í grannalondunum – og átøk verða sett í verk fyri at bøta um støðuna, m.a. landsumfevnandi átakið: “Føroyar lesa 2020”, eins og kvalitativ kanning verður gjørd í næstum.

Í sambandi við, at Føroyar lata upp sendistovu í Beijing, verður samstarv tikið upp við Kina um, at lesandi hiðani luttaka á summarskeiði í føroyskum á Setrinum – tey fyrstu nú í august.”

# LØGLISTI

## FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til samtyktar um umsitingarætlan og veiðireglur**
Samsvarandi § 33 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi skal landsstýrismaðurin leggja fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um umsitingarætlan og veiðireglur.
Uppskotið verður lagt fyri Løgtingið í heyst.

**Frágreiðing um støðuna í fyrisitingini av sjófeingi**
Samsvarandi § 21, stk. 3 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 um fyrisiting av sjófeingi skal landsstýrismaðurin, áðrenn 1. oktober á hvørjum ári, leggja fyri Løgtingið frágreiðing um støðuna í fyrisitingini av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja.
Frágreiðingin verður latin Løgtinginum áðrenn 1. oktober 2018.

**Gildistíð á rættindum**
Samsvarandi § 21, stk. 1 í løgtingslóg nr. 161 frá 18. desember 2017 skal landsstýrismaðurin á hvørjum ári leggja uppskot fyri Løgtingið, um gildistíðin á rættindum skal leingjast við einum ári. Uppskotið verður lagt fyri Løgtingið í heyst.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2020**
Samsvarandi stýrisskipanarlógini skal landsstýrismaðurin fyri 1. oktober á hvørjum ári leggja fyri Løgtingið uppskot um løgtingsfíggjarlóg fyri komandi álmanakkaár.

**Uppskot til játtanarkarmar 2021–2025**
Sambært játtanarskipan landsins skal landsstýrismaðurin leggja fram uppskot til løgtingssamtykt fyri 1. apríl, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár.

# HAGTØL

**Mynd 1:** Fólkatalið í Føroyum 1. januar, 1985 til 2019 ..... 68
**Mynd 2:** Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2018 ..... 68
**Mynd 3:** Fólk flutt til og úr Føroyum, januar 2007 til mai 2019 ..... 68
**Mynd 4:** Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan. 1996 til apríl 2019 ..... 69
**Mynd 5:** Løntakarar í tali og arbeiðsloysi í % (árstíðarjavnað), januar 1985 til apríl 2019 ..... 69
**Mynd 6:** Lønargjaldingar mánaðarliga (árstíðarjavnað), jan. 1985 til juni 2019 ..... 69
**Mynd 7:** Lønargjaldingar 12-mðr rullandi, jan. 1985 til juni 2019 ..... 70
**Mynd 8:** Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2018 ..... 70
**Mynd 9:** Brúkaraprístalið, 1. ársfj. 2001 til 1. ársfj. 2019. Indeks 1. ársfj. 2001 = 100 ..... 70
**Mynd 10:** Avreiðingar av feskfiski í virði, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2019 ..... 71
**Mynd 11:** Avreiðingar av feskfiski í nøgd, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2019 ..... 71
**Mynd 12:** Laksur og síl tikin skift á ár og slag, 1996 til 2018 ..... 71
**Mynd 13:** Innflutningur og útflutningur, 1988 til 2018 ..... 72
**Mynd 14:** Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan. 1998 til mai 2019 ..... 72
**Mynd 15:** Landskassans langfreistaða skuld og innistandandi og í % av BTÚ, 1997 til 2019 ..... 72
**Mynd 16:** Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, januar 2006 til juni 2019 ..... 73
**Mynd 17:** Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 til juni 2019 ..... 73
**Mynd 18:** Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 til juni 2019 ..... 73
**Mynd 19:** Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 til juni 2019 ..... 74
**Mynd 20:** Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 til juni 2019 ..... 74
**Mynd 21:** Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 til juni 2019 ..... 74

Mynd 1: Fólkatalið í Føroyum 1. januar, 1985 til 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 2: Broytingar í fólkatalinum, 1970 til 2018




Kelda: Hagstovan.

Mynd 3: Fólk flutt til og úr Føroyum, januar 2007 til mai 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 4: Árstíðarjavnað arbeiðsloysi í % av arbeiðsfjøld, jan. 1996 til apríl 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 5: Løntakarar í tali og arbeiðsloysi í % (árstíðarjavnað), januar 1985 til apríl 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 6: Lønargjaldingar mánaðarliga (árstíðarjavnað), jan. 1985 til juni 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 7: Lønargjaldingar 12-mðr rullandi, jan. 1985 til juni 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 8: Bruttotjóðarúrtøka í ársins prísum og árlig broyting í %, 1998-2018




* Tølini fyri 2018 eru framrokning hjá Búskaparráðnum.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 9: Brúkaraprístalið, 1. ársfj. 2001 til 1. ársfj. 2019. Indeks 1. ársfj. 2001 = 100




Kelda: Hagstovan.

Mynd 10: Avreiðingar av feskfiski í virði, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 11: Avreiðingar av feskfiski í nøgd, 12 mánaðir samanlagt, 1993 til mai 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 12: Laksur og síl tikin skift á ár og slag, 1996 til 2018




Kelda: Hagstovan.

Mynd 13: Innflutningur og útflutningur, 1988 til 2018




Viðm.: Handilsjavnin fevnir bara um vørur; tænastur eru sostatt ikki við.
Kelda: Hagstovan.

Mynd 14: Innflutningur av ódrúgvum, drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum og útgoldnar lønir, jan. 1998 til mai 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 15: Landskassans langfreistaða skuld og innistandandi og í % av BTÚ, 1997 til 2019




Kelda: Gjaldstovan.

Mynd 16: Konjunkturvísital fyri húsarhaldini, januar 2006 til juni 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 17: Konjunkturvísital fyri húsarhald og vinnu tilsamans, juni 2006 til juni 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 18: Konjunkturvísital fyri byggivinnuna, juni 2006 til juni 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 19: Konjunkturvísital fyri handilsvinnuna, juni 2006 til juni 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd 20: Konjunkturvísital fyri tænastuvinnuna, juni 2006 til juni 2019




Kelda: Hagstovan.

Mynd: 21: Konjunkturvísital fyri ídnaðar- og tilfeingisvinnur, juni 2006 til juni 2019




Kelda: Hagstovan.